ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

# Endurskoðan av barnverndarlógini

Frágreiðing til landsstýriskvinnuna um, hvørt lógin virkar eftir ætlan

Februar 2011

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur .....4
1.1. Arbeiðsbólkurin .....4
1.2. Arbeiðssetningur .....4
1.3. Avmarkingar .....4
1.4. Ummæli .....5
1.5. Hagtøl .....6
2. Lógarinnar endamál og øki .....6
2.1. Málbólkur .....6
2.2. Markamót og gráøki .....7
3. Umsiting av barnaverndarmálum .....8
3.1. Barnaverndarøkini .....8
3.2. Barnaverndartænastan .....9
3.3. Barnaverndarstova Føroya .....10
3.4. Høvuðsbarnaverndarnevndin .....11
4. Fráboðanarskyldan § 14 .....12
4.1. Fráboðan viðvíkjandi kvinnu, ið er við barn .....13
5. Tvørfakligt samstarv § 10 .....13
6. Fyriskipanir .....14
6.1. Fyribyrgjandi fyriskipanir § 15 .....14
6.1.1. Sálarfrøðiliga ella aðra hjálp § 15, stk. 1, nr. 1 .....15
6.1.2. Familjuviðgerð § 15, stk. 1, nr. 2 .....16
6.1.3. Sosialt frípláss § 15, stk. 1, nr. 4 .....17
6.1.4. Arbeiðstilboð v.m. § 15, stk. 1, nr. 5 .....18
6.1.5. Umlætting § 15, stk. 1, nr. 7 .....19
6.1.5.1. Tá børn eru sett til fosturs .....19
6.1.5.2. Tá børn eru sett á samdøgursstovn .....20
6.1.6. Fastan persón § 15, stk. 1, nr. 9 .....21
6.1.7. Barn kann venda sær ónavngivin til barnaverndartænastuna § 15, stk. 1, nr. 11 .21
6.2. Uppfylgjan av málinum § 16 .....21
6.3. Bráðfeingis avgerðir § 17 .....22
6.4. Læknakanning og viðgerð § 18 .....23
6.5. Yvirtøka av umsorganini fyri barninum .....24
6.5.1. Umsorganaryvirtøka § 19 .....24
6.5.2. Varandi umsorganaryvirtøka § 23 .....25

6.5.3. Samvera § 22 ..... 26

7. Fosturforeldraskipanin ..... 27

7.1. Rættindi hjá fosturforeldrum ..... 28

7.2. Samsýning til forsturforeldur ..... 29

7.3. Fosturforeldrafelagið ..... 30

8. Stovnar ..... 30

8.1. Serdagstovnur hjá landinum ..... 30

8.2. Rættindi undir búsitan á stovni ..... 30

9. Avgerðarmyndugleiki í fyriskipanum ..... 31

9.1. Fyribyrgjandi fyriskipanir ..... 31

9.2. Yvirtøka av umsorganini ..... 32

9.2.1. Inn- og útskrivan á stovn ..... 32

10. Málsviðgerð hjá barnaverndartænastunum ..... 34

10.1. Kanning av málinum § 45 ..... 34

10.2. Samstarv við foreldrini § 46 ..... 36

10.3. Ætlan í sambandi við eina fyriskipan § 47 ..... 37

11. Mál, ið viðvíkja fleiri barnaverndarøkjum ..... 38

11.1. Flyting innanlands ..... 38

11.2. Flyting til útlandið ..... 39

11.3. Barnið statt í Føroyum ..... 40

11.4. Ósemja § 63 ..... 40

12. Eftirlit ..... 40

13. Kærumøguleiki ..... 41

13.1. Kærumyndugleiki § 64 og § 65 ..... 41

13.1.1. Ivamál um, hvør er rætti kærumyndugleiki ..... 42

13.2. Kærurættur § 66 ..... 43

14. Uppalingarískoyti § 70 og § 71 ..... 43

15. Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar av barnaverndarlógini ..... 44

15.1. Fíggjarligu avleiðingarnar ..... 44

15.2. Umsitingarligar avleiðingar ..... 45

16. Orðalagið og allýsingar í lógini ..... 46

17. Verður endamálið rokkið ..... 47

18. Tilráddar tillagingar í barnaverndarlógini ..... 52

Skjøl: ..... 54

# 1. Inngangur

Barnaverndarlógin varð sett í gildi 1. januar 2006. Sambært § 84 í lógini skal landsstýriskvinnan, tá lógin hevur virkað í 5 ár, leggja fyri Løgtingið frágreiðing um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, her undir um broytingar mugu gerast í skipanini.

Í hesum sambandi hevur landsstýriskvinnan sett ein arbeiðsbólk at endurskoða barnaverndarlógina. Arbeiðsbólkurin skal gera frágreiðing til landsstýriskvinnuna, og skal frágreiðingin verða liðug áðrenn árslok 2010. Síðani verður frágreiðingin løgd fyri Løgtingið til aðalorðaskifti. Hetta verður helst á vári 2011.

## 1.1. Arbeiðsbólkurin

Arbeiðsbólkurin hevur verið mannaður soleiðis:

Umboðandi Høvuðsbarnaverndarnevndina: Johild Ziskason, samskipari.
Umboðandi Barnaverndarstovu Føroya: Oddbjørg Balle, leiðari.
Umboðandi Børn & Ung, Nærverkið: Berit Unn Petersen, fulltrúi, og Majbritt Lamhauge, fulltrúi.
Umboðandi Almannamálaráðið: Tórhild Højgaard, fulltrúi.

## 1.2. Arbeiðssetningur

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum hevur verið at endurskoða barnaverndarlógina sum ásett í § 84 í lógini.

"§ 84. Landsstýrismaðurin skal eftir 5 árum leggja fram frágreiðing um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, her undir um broytingar mugu gerast í skipanini".

Í viðmerkingunum til upprunauppskotið varð mett, at tá lógin hevði virkað í fimm ár, vóru skipanirnar rættiliga komnar í gongd, og tá var møguligt at eftirmeta skipanina. Uppgávan hjá bólkinum er sostatt um at gera eina eftirmeting av eini skipan, ið hevur virkað í fimm ár, og við støði í hesum at viðgera, hvørjar broytingar eru neyðugar.

Arbeiðsbólkurin skal hoyra viðkomandi partar, áðrenn endalig frágreiðing verður latin landsstýriskvinnuni.

## 1.3. Avmarkingar

Arbeiðið við at endurskoða barnaverndarlógina byrjaði við, at Almannamálaráðið sendi skriv til avvarðandi partarnar. Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt teir partar av lógini, sum viðmerkingar eru til, og sum verða mettir at skapa ávísar trupulleikar. Tískil verða teir partar av lógini, sum virka til fulnar og ikki skapa trupulleikar, ikki umrøddir í frágreiðingini.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki viðgjørt samdøgurstilboðini og Fosturforeldraskipanina, sum eru viðgjørd í áliti, sum varð handað landsstýriskvinnuni á Grækarismessu 2010 – "Ein felags hurð – endurskoðan av tilboðum og skipanum til børn, ung og familjur við serligum tørvi". Í staðin verður víst til álitið, har tað er mett viðkomandi. Í hesum sambandi skal vísast á, at arbeiðsbólkurin ikki hevur viðgjørt, hvørjar konsekvensbroytingar skulu gerast í lógini, um landsstýriskvinnan fylgir álitinum.

Barnaverndarlógin er skipað í 14 kapitlar og 84 lógargreinir, og hevur arbeiðsbólkurin valt at skipa hesa frágreiðing, soleiðis at hvørt kapittul í lógini verður so vítt gjørligt viðgjørt fyri seg.

Arbeiðið fevnir sostatt í høvuðsheitinum um at endurskoða:

- Lógarinnar endamál og øki (kap. 1 í Barnaverndarlógini)
- Umsiting av barnaverndarmálum (kap. 2)
- Fráboðanarskylda (kap. 3)
- Fyriskipanir, t.v.s. um uppfylgjan av málum, umsorganaryvirtøku v.m. (kap. 4)
- Fosturforeldraskipanin, herímillum avtalan við fosturforeldur og samsýning (kap. 5)
- Stovnar, t.v.s. um inn- og útskriving, rættindi undir búsitan á stovni v.m. (kap. 6)
- Málsviðgerðarreglur hjá barnaverndartænastum og Høvuðsbarnaverndarnevndini, herímillum um ætlan fyri barnið (kap. 7 og 8)
- Mál, ið viðvíkja fleiri barnaverndarøkjum, t.v.s. hvør hevur ábyrgdina av einum máli (kap. 9)
- Kærumøguleiki (kap. 10)
- Revsing (kap. 13)

Arbeiðsbólkurin hevur ikki viðgjørt møguligar fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar av uppskotnu broytingunum til lógina.

### 1.4. Ummæli

Almannamálaráðið sendi hin 18. juni 2010 skriv til allar barnaverndartænasturnar, Barnaverndarstovu Føroya, Fosturforeldraskipanina, Høvuðsbarnaverndarnevndina, Almannastovuna, Nærverkið, Føroya Barnaheim, Heilsumálaráðið, Gigni, Mentamálaráðið, Sernámsdepilin og Fosturforeldrafelagið, har boðað var frá, at arbeiðið við at endurskoða barnaverndarlógina byrjaði, og at ráðið ynskti at fáa viðmerkingar í mun til teirra hugsan um, hvussu barnaverndarlógin hevur virkað, og um møguligar broytingar eiga at gerast í lógini/skipanini.

Viðmerkingar komu inn frá Barnaverndarstovu Føroya, barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini, Almannastovuni/skrivstovuni hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, Føroya Barnaheimi, Blákrossheiminum, Gigni, Nærverkinum og Fosturforeldrafelagnum. Arbeiðsbólkurin hevur harafturat, hin 8. desember 2010, haft fund við Fosturforeldrafelagið.

Innkomnu viðmerkingarnar eru viðgjørdar og tiknar við í frágreiðingina.

Viðmerkjast skal, at arbeiðsbólkurin ikki hevur spurt foreldur og børn um, hvør teirra fatan er. Hetta tí tað krevur eitt størri arbeiði, enn arbeiðsbólkurin hevur orku og tíð til, at gjøgnumføra eina slíka kanning.

Frágreiðingin hevur verið til ummælis hjá Gigni, Fosturforeldrafelagnum, Barnaverndarstovu Føroya, Fostuforeldraskipanini og barnaverndartænastunum, Blákrossheiminum, Høvuðsbarnaverndarnevndini, Nærverkinum og Ríkisumboðnum. Nærverkið, Ríkisumboðið og Gigni náddu ikki at koma við viðmerkingum, áðrenn frágreiðingin skuldi latast

landsstýriskvinnuni. Hesi hava tó fingið at vita, at um tey senda viðmerkingarnar inn, verða tær viðgjørdar í sambandi við møguligar lógarbroytingar.

Viðmerkingarnar til frágreiðingina, sum eru komnar inn frá Fostuforeldrafelagnum, Gigni og barnaverndartænastunum, eru ikki viðgjørdar, men eru hjálagdar frágreiðingini sum skjal 1, 2 og 3.

### 1.5. Hagtøl

Í sambandi við endurskoðanina av barnaverndarlógini hevur arbeiðsbólkurin útvegað sær hagtøl yvir, hvussu nógvar avgerðir, ið eru tiknar eftir lógini, eru kærdar, umframt um metingarnar av fíggjarligu og umsitingarligu avleiðingunum av at seta lógina í gildi hava hildið.

Hagtølini eru tikin við í frágreiðingina.

## 2. Lógarinnar endamál og øki

Barnaverndarlógin avloysti barnaforsorgarlógina, sum varð sett í gildi fyri Føroyar í oktober 1960. Neyðugt var við einari dagførdari barnaverndarskipan, sum kundi lúka tey krøv, ið samfelagið setur, herímillum at betra um rættartrygdina hjá børnum og foreldrum í málum fevnd av lógini.

Endamálið við lógini er ásett í § 1:

> § 1. Endamálið við hesi lóg er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur.
> *Stk. 2.* Myndugleikarnir skulu leggja dent á at finna loysnir, sum eru best fyri barnið.

Endamálsorðingin er sett í lógina til tess at gera lógina greiðari og lættari atkomandi fyri einstaka borgaran og fyri tey starvsfólk, ið skulu arbeiða við lógini. Samstundis avmarkar greinin eisini lógarinnar málbólk til at fevna um børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning.

### 2.1. Málbólkur

Greinarnar 2 og 3 áseta ávikavist aldursbólkin, sum er fevndur av lógini, umframt lógarinnar geografisku avmarking.

> § 2. Lógin fevnir um børn í aldrinum frá 0 til fylta 18. árið.
> *Stk. 2.* Í serligum førum kunnu fyriskipanir, ið eru settar í verk, innan barnið hevur fylt 18 ár, halda áfram, til viðkomandi fyllir 21 ár, um viðkomandi samtykkir. Um fyriskipanin ikki rínur við viðkomandi, og tað tí ikki tænir nøkrum endamáli, at viðkomandi er fevndur av hesi lóg, kann fyriskipanin ikki halda áfram.
> *Stk. 3.* Somuleiðis fevnir lógin í teimum í § 14 nevndu førum um ófødda barnið.

> § 3. Lógin er galdandi fyri børn, ið eru stødd í Føroyum.

Sambært grein 2 fevnir lógin um børn í aldrinum 0–18 ár, og í serligum førum til viðkomandi fyllir 21 ár. Harafturat er ófødda barnið eisini fevnt av lógini, um so er, at familjan/foreldrini hava tørv á stuðli vegna trupulleikar, ið kunnu skaða barnið.

Lógin fevnir um øll børn, ið eru stødd í Føroyum. Lógin fevnir sostatt eisini um børn, sum ikki eru føroyingar, og sum í eitt tíðarskeið eru stødd í Føroyum.

Við at samanhalda greinarnar 1, 2 og 3 er málbólkurin hjá barnaverndarlógini ófødd børn (fostur) umframt børn og ung, upp til 18 ár (í ávísum førum upp til 21 ár), sum eru stødd í Føroyum og liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning.

Tað stendur ikki beinleiðis í lógini, at børn, ið bera brek, eru fevnd av lógini, men sambært viðmerkingunum til § 1 eru børn, ið bera brek, fevnd av lógini á jøvnum føti við onnur børn, um tey liva undir viðurskiftum, ið skaða teirra heilsu og menning. Sí eisini undir 2.2. Markamót og gráøki.

Fyriskipanir kunnu sostatt setast í verk mótvegis øllum børnum og ungum, ið eru stødd í Føroyum, og sum eru í aldrinum 0–18 ár, um hesi liva undir viðurskiftum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning. Sí tó undir 11. Mál, ið viðvíkja fleiri barnaverndarøkjum.

Ein fyriskipan, ið er sett í verk áðrenn tann ungi fyllir 18 ár, kann halda fram til viðkomandi fyllir 21 ár, um hetta tænir endamálinum við fyriskipanini.

Eisini kann ein fyriskipan setast í verk mótvegis eini kvinnu, ið er við barn, um vandi er fyri, at fostrið tekur skaða. Sí eisini undir 4.1. Fráboðan viðvíkjandi kvinnu, ið er við barn.

Mett verður, at galdandi orðing í høvuðsheitinum er nøktandi. Tó hevði tað í ávísum førum verið gott, um ein fyriskipan kundi hildið fram – sum eftirvernd/útslúsing – til tann ungi fyllir 23 ár. Hetta tí at børn og ung við trupulleikum ofta ikki eru heilt sjálvbjargin, tá tey gerast 21 ár, og hava tørv á ávísum stuðli. Um aldursmarkið verður víðkað til fylta 23. árið, verður tryggjað, at yvirgangurin til eina vaksnamannatilveru verður lættari, og at tann ungi fær neyðuga stuðulin til at gerast sjálvbjargin.

Tískil verður mælt til, at tað verður ásett í lógini, at ein fyriskipan sum eftirvernd/útslúsing kann halda fram, til tann ungi fyllir 23 ár. Tó soleiðis, at eftirvernd/útslúsing bert kann setast í verk sum framhald av aðrari fyriskipan, ið er sett í verk, áðrenn tann ungi fyllir 18 ár. Um henda broyting verður framd, verður møguligt í serligum førum at lata eina fyriskipan, sum er sett í verk áðrenn tann ungi fyllir 18 ár, halda fram, til tann ungi fyllir 21 ár. Harafturat verður møguligt at seta eftirvernd/útslúsing í verk, tá tann ungi fyllir 18/21 ár og inntil fylta 23. árið. Eftirvernd/útslúsing skal tó bert setast í verk, um tað tænir endamálinum at gera tann unga meira sjálvbjargnan.

## 2.2. Markamót og gráøki

Barnaverndarlógin fevnir, sum víst á omanfyri, um øll børn, t.e. bæði um børn, ið bera brek, og børn, ið ikki bera brek.

Í ávísum førum, tá talan er um børn, ið bera brek, hevur tað víst seg at vera trupulleikar í sambandi við samstarvið millum skipanirnar, t.e. skipanina eftir forsorgarlógini og skipanina eftir barnaverndarlógini.

Mett verður, at trupulleikarnir stava frá, at tað ikki er heilt greitt, hvussu mál, ið eru fevnd av báðum skipanunum, skulu viðgerast, og ivi er um, hvør skipan hevur ábyrgd av hvørjum parti av málinum. Harafturat vísir tað seg í ávísum málum sum um, at skipanirnar ikki vita, hvørja tænastu hin skipanin hevur heimild til at veita.

Tørvur er eisini á at greiða markamótið millum barnaverndarlógina og forsorgarlógina í mun til, hvør hevur fíggjarligu ábyrgdina, eitt nú í mun til vanligar húsarhaldsvørur, tá bráðfeingis tørvur er á hesum, eins og í mun til mista arbeiðsinntøku, tá familjur eru innskrivaðar á samdøgursstovn til familjuviðgerð.

Mett verður, at trupulleikarnir kunnu loysast, um vegleiðing og mannagongdir verða gjørdar, ið áseta, hvussu slík mál skulu viðgerast, og um hvør skipan hevur ábyrgd av hvørjum. Um trupulleikar framvegis vera, eftir at hesar eru gjørdar, kann ein nevnd setast, ið skal avgera, hvør eigur málið.

Harafturat fevnir barnaverndarlógin um børn, sum eru stødd í Føroyum, t.e. eisini børn, ið eru ættleidd. Hesi eru fevnd av lógini, frá tí tey koma til Føroyar, á jøvnum føti við onnur børn.

Í sambandi við ættleidd børn hevur tað víst seg at vera markamót og gráøki mótvegis ættleiðingarlógini, tá ein góðkenning um ættleiðing verður afturtikin og tískil fellur burtur. Spurningurin er, hvør skal rinda fyri stovnspláss/fosturforeldur, tá eitt ættleitt barn verður tikið frá "foreldrunum" í hesum sambandi. Mælt verður til, at greiða verður fingin á hesum spurningi, og at vegleiðing verður gjørd hesum viðvíkjandi.

## 3. Umsiting av barnaverndarmálum

Innkomnu viðmerkingarnar vísa á, at barnaverndarlógin verður umsitin ymiskt um alt landið, t.e. at málsviðgerðin ikki er eins. Víst verður eisini á, at barnaverndarøkini eiga at vera munandi størri og styrkjast fakliga. Viðmerkingarnar vísa eisini á, at avgerðarmyndugleikin í ávísum málum møguliga eigur at verða fluttur frá lokalu barnaverndarnevndini til annan miðsavnaðan myndugleika, møguliga til Barnaverndarstovu Føroya. Fosturforeldrafelagið metir, at barnaverndarnevndirnar eiga at styrkjast fakliga, og fáa víðkaðar heimildir, soleiðis at tær kunnu taka avgerð í ávísum málum – í staðin fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Í sambandi við uppgávubýtið millum landið og kommunurnar annars verður víst til álitið "Ein felags hurð", sum varð handað landsstýriskvinnuni á Grækarismessu.

### 3.1. Barnaverndarøkini

Í sambandi við, at barnaverndarlógin varð sett í gildi, blivu 8 barnaverndarøki skipað. Staðfestast má, at politiski viljin í kommununum hevur ynskt tað soleiðis, og gongdin er farin frá 8 barnaverndartænastum til 10 barnaverndartænastur ímóti tilráðingum frá eitt nú Barnaverndarstovu Føroya og barnaverndartænastunum.

Arbeiðsbólkurin metir, at hvørt barnaverndarøkið eigur at hava í minsta lagi 3.000 íbúgvar, og at økini eiga at verða landafrøðiliga samanhangandi, í tann mun tað er møguligt. Mett verður, at við at gera økini størri, vil fakliga støðið eisini styrkjast. Mælt verður tískil til at broyta § 4, stk. 1 og stk. 5.

Í sambandi við støddina á barnaverndarøkjunum kann eisini vísast til álitið "Ein felags hurð".

Viðmerkjast skal, at síðan barnaverndarlógin varð sett í gildi, og samstarvsøkir í hesum sambandi vóru góðkend, er løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur[1] sett í gildi. Henda lógin ásetur m.a., hvørjar kommunur kunnu samstarva. Tískil verður mett, at § 4, stk. 5, 1. pkt. í barnaverndarlógini eigur at vísa til omanfyri nevndu løgtingslóg, soleiðis at bert samstarvsøkir, ið eru í samsvari við omanfyri nevndu løgtingslóg, kunnu góðkennast eftir barnaverndarlógini. Ikki øll núverandi barnaverndarøkir eru í samsvari við løgtingslógina um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.

### 3.2. Barnaverndartænastan

Barnaverndartænasturnar hava reist spurningin um, hvørt verandi skipan við barnaverndarnevndum og barnaverndarumsitingum skal halda fram, ella barnaverndarnevndirnar skulu avtakast.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað eigur at verða hildið fast við verandi skipan við barnaverndarnevndum og barnaverndarumsitingum. Hetta fyri at tryggja, at tað eisini í mun til fyribyrgjandi fyriskipanir er eitt ávíst eftirlit við, at fyriskipanin stendur mát við trupulleikarnar, sum eru.

Mett verður ikki, at Barnaverndarstova Føroya skal verða avgerðarmyndugleiki, hetta tí hon er ráðgevi og vegleiðir barnaverndartænastunum í ymiskum málum.

Í mun til fakligu førleikarnar vísur Gigni á, at krøvini til fakliga ástøði hjá limunum í barnaverndarnevndunum er ov lágt sett, og at tað er neyðugt at raðfesta barnaserkunnleikan. Arbeiðsbólkurin metir, at krøvini til fakliga førleikan hjá limunum í barnaverndarnevndunum er nøktandi, við tað at lógin setir krøv um viðkomandi útbúgving. Havast skal í huga, at miðað verður ímóti, at limirnir í nevndini eisini skulu verða umboðandi í mun til vanliga borgaran. Barnaverndarnevndin tekur bert avgerð út frá tilmæli frá barnaverndarumsitingini. Barnaverndarumsitingin hevur málsviðgerðina um hendi og samskiftir við m.a. foreldur, børn og aðrar myndugleikar. Tað er tískil upp til barnaverndarumsitingina at lýsa málið og grundgeva nøktandi fyri nevndini um, hví ein fyriskipan eigur at setast í verk.

Harafturímóti verður mett, at í mun til barnaverndarumsitingina eigur at verða ásett, at starvsfólk skal verða, ið hevur sosialfakliga útbúgving og hollan kunnleika til fyrisitingarrætt. Útbúgvingin skal í minsta lagi vera á bachelor støði (á linju við bachelor). Hetta tí tað er sera umráðandi, at mál verða viðgjørd rætt fyrisitingarliga.

[1] Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007.

Um barnið ella familjan hava ein serligan tørv ella trupulleika, sum starvsfólk á barnaverndarumsitingini ikki hava fakligan førleika at meta um, eigur umsitingin at leita sær ráð og vegleiðing frá fólki, ið hevur serligan fakligan kunnleika í mun til tørvin ella trupulleikan, soleiðis at fakliga ástøði í málsviðgerðini eisini verður raðfest. Her skal viðmerkjast, at Barnaverndarstova Føroya hevur sálarfrøðing í starvi, ið eisini vegleiðir barnaverndarumsitingunum, og at barnaverndarumsitingarnar, tá tað verður mett neyðugt, keypa fakligan førleika inn, sum ikki frammanundan finst í umsitingunum.

Gigni vísir eisini á, at vandi er fyri, at atlit til peningalig viðurskifti verða tikin framum fakliga grundað tilmæli, tá sosiala deild og barnaverndartænastan eru sami stovnur. Her kann viðmerkjast, at barnaverndarnevndin er óheft av sosialu deild.

### 3.3. Barnaverndarstova Føroya

Í lógaruppskotinum, sum var lagt fyri Løgtingið, var ætlanin, at Barnaverndarstova Føroya skuldi verða ein landsstovnur. Hetta bleiv tó broytt, soleiðis at Barnaverndarstova Føroya í samtyktu lógini er ein felagskommunalur stovnur.

Mett verður, at tað eigur at umhugsast, um tað skulu gerast nakrar konsekvensbroytingar í uppgávunum hjá Barnaverndarstovu Føroya, í sambandi við at stovnurin er felagskommunalur.

Eitt nú eigur at umhugsast, um § 13, stk. 1, nr. 2 eigur at strikast, ella um Barnaverndarstova Føroya framvegis skal virka sum ráðgevi hjá landsstýrismanninum, hóast hon er kommunal. Vísast skal tó á, at Barnaverndarstova Føroya sjálv ikki ynskir, at ásetingin skal strikast. Barnaverndarstova Føroya vísir á, at tað ikki er í mun til øll øki í barnaverndarlógini, at nakar prinsipiellur trupulleiki stendst av, at Barnaverndarstova Føroya sum kommunalur stovnur ráðgevur landinum/landsstýrismanninum. Heldur øvugt má sjálvur serkunnleikin innan barnaverndardøki sigast at vera politiskt rættiliga neutralur, hóast onkur markamót eru millum land og kommunur innan økið. Kommunurnar, ið umsita barnaverndarmál, hava mest innlit og serkunnleika innan barnaverndarøkið, og hesin serkunnleiki er neyvan serliga politiskt litaður. Tí metir Barnaverndarstova Føroya, at hon framvegis eigur at ráðgeva landsstýrismanninum í mun til faklig stevnumið á barnaverndarøkinum. Hetta eisini tí Barnaverndarstovna Føroya sum ráðgevi hjá øllum 10 barnaverndartænastunum í landinum hevur besta innlitið í alt barnaverndarøkið, og má metast at vera hægsti serkunnleikin á økinum. Barnaverndarstova Føroya metir, at tað er ein fyrimunur, at tað er ásett í lógini, at hon er ráðgevandi, soleiðis at hon altíð verður hoyrd, áðrenn broytingar verða framdar.

Restin av arbeiðsbólkinum metir annars, at tað kann gerast ein loyalitetstrupulleiki hjá Barnaverndarstovu Føroya at ráðgeva landsstýrismanninum, tá Barnaverndarstovan er kommunal, og at tað annars liggur í góðum fyrisitingarsiði, at avvarðandi partar verða hoyrdir, áðrenn broytingar verða framdar, og at tað tískil ikki er neyðugt at áseta hetta í lóg.

Sum omanfyri nevnt var ásett í lógaruppskotinum, sum var lagt fyri Løgtingið, at Barnaverndarstova Føroya skuldi vera ein landsstovnur. Harafturat skuldi Barnaverndarstova Føroya umsita samdøgursstovnarnar. Í sambandi við, at lógaruppskotið bleiv broytt, soleiðis at Barnverndarstova Føroya nú er ein felagskommunalur stovnur, varð umsitingin av

samdøgursstovnunum løgd til landsstýrismannin. Landið umsitur sostatt samdøgursstovnarnar. Mett verður, at tað eigur at gerast ein konsekvensbroyting í sambandi við, at Barnaverndarstova Føroya ikki umsitur samdøgursstovnarnar, soleiðis at ásetingin í § 13, stk. 1, nr. 5 um, at Barnaverndarstova Føroya ráðgevur og vegleiðir samdøgursstovnunum, verður strikað.

Enn er ikki komið heilt á mál í mun til, at málsviðgerðin hjá barnaverndartænastunum er eins í øllum landinum, men tað gongur framá. Mett verður, at m.a. vantandi vegleiðingar til lógina og vantandi kunngerðir eru medvirkandi til, at ivi er um, hvussu ymisk viðurskifti skulu viðgerast, og at hetta hevur við sær, at umsitið verður ymiskt. Viðmerkjast skal, at Barnaverndarstova Føroya við regluligum fundum millum økini miðvíst arbeiðir við at fáa málsviðgerðina meira einsháttaða.

Í mun til uppgávuna at savna saman og umsita hagtøl á økinum eigur støða at verða tikin til, hvørji hagtøl ynskjast, herímillum hvat hagtølini skulu brúkast til. Harafturat eigur støða at verða tikin til, um hagtølini bert skulu fata um kommunala økið, ella um hagtølini skulu fata um alt økið, t.e. um Barnaverndarstova Føroya eisini skal savna og umsita hagtøl viðvíkjandi samdøgursstovnunum. Í hesum sambandi verður hugsað um nøgdarhagtøl, ið kunnu siga nakað um tal av børnum, innskrivingargrundarlag, tíðarskeið, valdsnýtslu v.m.

Viðmerkjast kann, at Barnaverndarstova Føroya eisini umsitur SSP-ráðgevingina.

### 3.4. Høvuðsbarnaverndarnevndin

Mett verður, at tað eigur at umhugsast, um tað skulu ásetast avmarkingar um, hvussu leingi ein limur kann sita í nevndini.

Fyrimunir og vansar er við at skifta nevndina út. Tað tekur tíð hjá einum limi at menna sínar fakligu førleikar í starvinum, soleiðis at viðkomandi følir seg "tryggan" at taka truplar avgerðir. Hinvegin kann tað vera skilagott at skifta út, soleiðis at "nýggj eygu" eru. Í øllum førum má tað vera soleiðis, at ikki allir limir verða skiftir út í senn.

Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur fund 14. hvønn dag, og metir arbeiðsbólkurin, at hetta er nøktandi. Sí tó eisini undir 6.3. Bráðfeingis avgerðir.

Fosturforeldrafelagið er ikki nøkt við Høvuðsbarnaverndarnevndina. Felagið vísir á, at við Høvuðsbarnaverndarnevndini er avgerðin flutt eitt lið longur út frá tí veruliga lívinum. Felagið metir, at avgerðirnar hjá nevndini ikki eru í samsvari við veruleikan hjá børnunum, og ynskir, sum omanfyri nevnt, at barnaverndarnevndirnar fáa heimild at taka fleiri avgerðir, sum skulu kunna kærast til Føroya Rætt. Felagið vísir tó á, at ein nevnd eigur at setast, ið skal eftirhyggja øll mál, har samtykki ikki fyriliggur, og tryggja, at øll neyðug atlit eru tikin í málsviðgerðini.

Barnaverndartænasturnar hava fyrr víst á ávísa ónøgd við Høvuðsbarnaverndarnevndina, men meta, nú nevndin hevur virkað í 5 ár, at nevndin hevur ment seg, og torir at taka truplar avgerðir, tá hetta er neyðugt. Barnaverndartænasturnar meta sostatt, at Høvuðsbarnaverndarnevndin virkar nøktandi í dag. Barnaverndartænasturnar meta tó, at

nevndin setir krøv til málsviðgerð og fyrisiting, sum í ávísum málum kunnu tykjast ov stór, eitt nú í málum, har samtykki fyriliggur.

Barnaverndartænasturnar meta harumframt, at tann meklandi leikluturin, sum Høvuðsbarnaverndarnevndin til tíðir hevur havt á fundum, ikki er so heppin. Mett verður tó, at hesin trupulleiki verður loystur við einum tillutanarbólki. Sí eisini undir 9.2.1. Inn- og útskrivan á stovn.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er neyðugt, at ein óheft miðsavnað nevnd tekur avgerð í málum, har samtykki ikki fyriliggur, umframt í málum, har avgerðin ger stór inntriv í familjuna, soleiðis at tað verður tryggjað, at grundarlag er fyri avgerðini. Mett verður tískil, at Høvuðsbarnaverndarnevndin skal halda fram.

## 4. Fráboðanarskyldan § 14

Sambært § 14 hava øll fráboðanarskyldu. Fráboðast skal til barnaverndartænastuna.

> § 14. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.
> *Stk. 2.* Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari t.d. misrøkir, meinslar, misnýtir ella handfer barn soleiðis, at álvarsamur vandi er fyri tess sálarligu ella likamligu heilsu ella búning, hevur skyldu at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.
> *Stk. 3.* Fráboðast skal eisini viðvíkjandi kvinnum, ið eru við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna álvarsama rúsevnismisnýtslu, sálarsjúku ella sálartrupulleikar.
> *Stk. 4.* Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49.

Eftir verandi orðing av § 14, stk. 1 skulu fakfólk fráboða, um tey fáa *kunnleika* til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini. Mett verður, at fráboðanarskyldan hjá fakfólki eigur at skerpast soleiðis, at fakfólk skulu fráboða, um tey fáa *varhugan* um viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini. Hetta fyri at tryggja, at einhvør ivi kemur barninum til góðar, og at tað, um neyðugt, verður sett inn so tíðliga sum gjørligt.

Sambært hagtalsfrágreiðingini frá Barnaverndarstovu Føroya fyri 2009 eru tað oftast foreldur, ið venda sær til barnaverndartænasturnar, um trupulleikar eru. Hetta verður mett sera gott og vísir, at rákið er vent, soleiðis at barnaverndartænastan í stóran mun verður sæð sum ein, ið familjan kann fáa hjálp frá, ella við øðrum orðum sum ein tænasta.

Gigni hevur sett fram ynski um, at barnaverndartænastan skal svara fráboðaranum um, hvørt ein fyriskipan verður sett inn ella ikki í sambandi við eina fráboðan. Gigni vísir á, at tað er umráðandi hjá Gigni at vita, um barnaverndartænastan setur eina fyriskipan í verk í eini familju, har Gigni er inni og veitir eina tænastu, soleiðis at partarnir vita av hvørjum øðrum.

Tað einasta, sum stendur í viðmerkingunum til barnaverndarlógina, er, at tann, ið fráboðað er um, skal kunnast, um so er, at barnaverndarnevndin avger ikki at gera meira við eina fráboðan.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er ikki í tráð við reglurnar um tagnaðarskyldu at senda einum fráboðara boð um, hvørt ein fyriskipan verður sett í verk ella ikki, men metir at verandi praksis, har barnaverndartænastan sendur fráboðaranum eina móttøkuváttan, er nøktandi. Hetta fyri at tryggja, at óneyðugur kunnleiki til eitt mál ikki verður breiddur út.

Er fráboðarin fakfólk, t.v.s. ein, sum í starvi sínum hevur við børn at gera, fær hesin kunnleika til eina møguliga fyriskipan í sambandi við tað tvørfakliga samstarvið, um so er, at tørvur er á hesum í tí ítøkiliga málinum. Sí eisini undir 5. Tvørfakligt samstarv.

Tó verður mett, at Almannamálaráðið og Barnaverndarstova Føroya í samstarvi við aðrar myndugleikar framhaldandi eiga at arbeiða við at vegleiða fakfólki um skylduna at fráboða.

### 4.1. Fráboðan viðvíkjandi kvinnu, ið er við barn

Starvsfólk innan tað almanna skulu fráboða til barnaverndartænastuna, áðrenn barnið er føtt, um tey meta, at tørvur er á stuðli eftir barnaverndarlógini. Endamálið er at veita familjuni stuðul, ímeðan mamman er við barn, um hetta er neyðugt, og at barnið kann fáa hjálp frá barnaverndarmyndugleikunum beinanvegin, tað er føtt. Um ein ætlan verður gjørd, áðrenn barnið er føtt, kann fyriskipanin setast í verk beinanvegin, barnið er føtt.

Er talan um rúsevnismisnýtslu, kann fyriskipan setast í verk, áðrenn barnið er føtt, t.d. við at kvinnan fer í rúsevnisviðgerð. Sí eisini undir 6.1.1. Sálarfrøðiliga ella aðra hjálp.

Sambært viðmerkingunum til greinina kann fyriskipan eisini setast í verk, um kvinnan hevur sálarligar, likamligar ella sosialar trupulleikar, og tí ikki er før fyri at syrgja fyri barninum.

Gigni metir, at orðingin í stk. 3 er ov veik, og ynskir, at tað í lógini verða ásetingar viðvíkjandi viðbreknum kvinnum, sum eru við barn, sum hava likamligar, sálarligar og/ella sosialar trupulleikar. Hetta kunnu t.d. vera tannáringar, kvinnur uttan sosialt trygdarnet, kvinnur, sum hava aðrar likamligar, sálarligar og sosialar trupulleikar.

Arbeiðsbólkurin metir, at greinin og viðmerkingarnar til greinina eru greiðar og taka atlit til tey viðurskifti, sum Gigni vísir á. Tó metir arbeiðsbólkurin, at orðið "álvarsama" í stk. 3 eigur at strikast. Hetta fyri at tryggja, at ein borgari ikki aftrar seg við at fráboða, tí viðkomandi ikki veit, um talan er um álvarsama rúsevnismisnýtslu. Tað, sum er avgerandi, er, um talan er um misnýtslu. Mett verður, at allur ivi skal koma ófødda barninum til góðar. Ein kanning av málinum finnur fram til, um ein fyriskipan skal setast í verk.

## 5. Tvørfakligt samstarv § 10

Barnaverndarlógin áleggur barnaverndartænastuni at samstarva tvørfakligt við aðrar barnaverndartænastur, myndugleikar og fakbólkar. Endamálið við ásetingini er at tryggja børnum og ungum við serligum tørvi rættan stuðul rættstundis, umframt at tryggja, at samband verður fingið í lag millum barnið og serkunnleikan. Royndir vísa, at eitt gott samstarv tryggjar stuðul til barnið so tíðliga sum gjørligt, soleiðis at barnið kann hjálpast á rætta leið, áðrenn ov seint er.

Tað tvørfakliga samstarvið er ymiskt um landið. Í nøkrum økjum virkar samstarvið gott, meðan tað í øðrum økjum virkar minni gott.

At skipa fyri tvørfakligum samstarvi er ein stór uppgáva hjá barnaverndartænastunum, tí talan kann vera um samstarv við fleiri myndugleikar og fakbólkar í tí einstaka málinum. Uppgávan kann gerast sera trupul, um ivamál eru í mun til tvørfakliga samstarvið.

Mett verður, at trupulleikarnir við tvørfakliga samstarvinum stava frá, at ivi er um, hvør myndugleiki/fakbólkur ger hvat, og hvør hevur ábyrgdina av hvørjum, eins og ivi er um, hvussu langt tagnarskyldan røkkur.

Gigni vísir á, at tað er alneyðugt við greiðum mannagongdum um samstarv í málum viðvíkjandi familjum, har bæði Gigni og barnaverndartænastan hava ein aktivan leiklut. Gigni vísir eisini á, at neyðugt er við kunning, soleiðis at teir ymisku fakbólkarnir/myndugleikarnir, ið arbeiða við familjuni/barninum, eru vitandi um fyriskipanirnar, sum ein annar myndugleiki hevur sett í verk.

Arbeiðsbólkurin er samdur við Gigni í, at tað er neyðugt við samstarvi millum myndugleikar/fakbólkar í málunum til tess at tryggja, at fyriskipanirnar hóska saman og ikki virka ímóti hvørjari aðrari, eins og fakligi førleikin verður gagnnýttur best møguligt. Mett verður, at flestu trupulleikar í mun til tvørfakligt samstarv kunnu loysast við, at Barnaverndarstova Føroya og Almannamálaráðið, í samstarvi við aðrar myndugleikar, gera vegleiðing og mannagongdir um tvørfakligt samstarv á økinum, og at serligar mannagongdir og reglur viðvíkjandi latan av trúnaðarupplýsingum verða gjørdar.

Eisini ynskir Gigni, at ein serstøk áseting verður gjørd um samstarv við Gigni á sama hátt sum í § 50, ið ásetur, at barnaverndarnevndin kann biðja løgregluna um hjálp at fremja kanningar og avgerðir tiknar sambært lógini.

Arbeiðsbólkurin metir ikki, at serstøk áseting skal gerast um samstarv við Gigni. Samstarv við Gigni er ásett í § 10 um tvørfakligt samstarv, og verður hetta mett nøktandi.

## 6. Fyriskipanir

Barnaverndarnevndirnar hava heimild at seta ymiskar fyriskipanir í verk, antin við egnari avgerð ella eftir avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini, ið tekur avgerð eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini.

### 6.1. Fyribyrgjandi fyriskipanir § 15

Barnaverndarnevndin kann seta fyribyrgjandi fyriskipanir í verk við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, um kanningin sambært § 45 vísir, at hetta er neyðugt. Nakrar av fyriskipanunum kunnu tó setast í verk uttan samtykki frá tí, ið hevur foreldramyndugleikan, um barnið gevur samtykki. Samtykki krevst bara frá barninum, um tað hevur fylt 15 ár.

> § 15. Um kanningin sambært § 45 vísir, at neyðugt er at seta fyriskipanir í verk fyri barnið sambært hesi lóg, skal barnaverndarnevndin við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir í verk, undir hesum:

1) veita sálarfrøðiliga ella aðra hóskandi hjálp til barnið og/ella familjuna,
2) veita familjuviðgerð ella líknandi stuðul,
3) veita stuðul í heiminum,
4) veita heilt ella partvíst ansingarpláss á dagstovni, í dagrøkt ella líknandi fyri børn, tá ið tað av sosialum, námsfrøðiligum og fíggjarligum orsøkum verður mett at vera neyðugt, men tá ið fíggjarligt frípláss ikki kann veitast,
5) hjálpa við at finna hóskandi útbúgvingarpláss, arbeiðspláss ella líknandi til barnið,
6) menna frítíðarvirksemið hjá barninum,
7) geva tilboð um umlættingarskipan hjá góðkendum fosturforeldrum,
8) stuðla foreldrum at fáa og fullføra viðgerð vegna sjúku, rúsevnismisnýtslu ella aðrar persónligar trupulleikar,
9) tilnevna ein fastan persón, ið barnið altíð kann seta seg í samband við við sínum trupulleikum,
10) veita persónligan ráðgeva til barnið,
11) veita barninum tryggleika á tann hátt, at barnið kann venda sær til barnaverndartænastuna við sínum trupulleikum, uttan at hetta verður fráboðað foreldrunum.

*Stk. 2.* Barnaverndarnevndin kann um neyðugt seta fyriskipanir eftir stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9 og 10 í verk, hóast foreldur/foreldramyndugleiki ikki loyva tí, um tað má metast at vera av munandi týdningi fyri barnsins serliga tørv á stuðli, og tá ið endamálið við fyriskipanini verður mett at kunna røkkast uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Um barnið hevur fylt 15 ár, skal samtykki í hesum føri tó fáast frá barninum, áðrenn nøkur fyriskipan verður sett í verk.
*Stk. 3.* Umframt at kommunan heldur útreiðslurnar, ið standast av stk. 1, sbr. § 68, kann barnaverndarnevndin veita fíggjarligan stuðul til útreiðslur, ið fylgja av fyriskipanum eftir stk. 1, nr. 1-8, tá ið foreldrini ikki sjálvi megna útreiðslurnar.
*Stk. 4.* Mál viðvíkjandi familjuviðgerð á stovnum hjá landinum og viðvíkjandi tilboði á dagstovni fyri børn, ið eru fevnd av hesi lóg og sum ikki kunnu integrerast á kommunalan dagstovn, skulu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Fyriskipanirnar í stk. 1 eru orðaðar soleiðis, at tær kunnu tulkast vítt fyri ikki at forða barnaverndarnevndini í at veita hjálp, tá ið tað verður mett neyðugt fyri familjuna ella barnið. Harafturat er uppreksanin í stk. 1 bert at meta sum dømir, við tað at tað stendur "undir hesum". Treytin fyri at seta fyribyrgjandi fyriskipanir í verk er, at fyriskipanin er neyðug fyri serliga tørvin hjá barninum. Mett verður, at tað er umráðandi, at § 15, stk. 1 ikki er tømandi. Hetta tí gransking í barnaverndarmálum kann koma at vísa, at ávísar fyribyrgjandi fyriskipanir, sum ikki eru nevndar í lógini, eru best egnaðar í mun til serliga tørvin hjá barninum. Sostatt hevur barnaverndarnevndin møguleika at seta inn við fyriskipan, sum ikki er nevnd í lógini, um so er, at treytirnar annars eru loknar.

Sum heild verður mett, at ásetingarnar í § 15 virka væl. Tó verður mett, at onkrar broytingar skulu gerast.

### 6.1.1. Sálarfrøðiliga ella aðra hjálp § 15, stk. 1, nr. 1

Heimild er í § 15, stk. 1, nr. 1 at veita barninum sálarfrøðiliga hjálp, eisini uttan samtykki frá tí, ið hevur foreldramyndugleikan. Tó eigur foreldramyndugleikin at fáa kunning.

Børn eru, sum ynskja sálarfrøðiliga hjálp, uttan at foreldrini fáa kunning um hetta. Tískil ynskja barnaverndartænasturnar at fáa heimild til, í serligum førum, at veita børnum hesa

hjálp, uttan at foreldramyndugleikin verður kunnaður. Hetta tí tað kemur fyri, at foreldrini ikki kenna seg tryggan við, at teirra barn tosar við sálarfrøðing, sjálvt um barnið ynskir tað og hevur tørv á sálarfrøðiligari hjálp. Í summum førum vilja foreldrini vita, hvat barnið hevur tosað við sálarfrøðingin um. Hetta kann hava við sær, at barnið ikki kennir seg tryggan við at tosa við sálarfrøðingin, og viðgerðin tískil ikki eydnast. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesi broyting.

§ 15, stk. 1, nr. 1 heimilar eisini, at rúsevnisviðgerð verður sett í verk. Barnið kann sambært § 15, stk. 2 setast í viðgerð eftir stk. 1, nr. 1, hóast tann, ið hevur foreldramyndugleikan, ikki gevur sítt samtykki, um barnið er yvir 15 ár og gevur sítt samtykki. Sambært viðmerkingunum til stk. 2 kann barnaverndarnevndin tó ikki noyða eina avgerð ígjøgnum og taka barnið úr heiminum við tvingsli, um tann, ið hevur foreldramyndugleikan, setur seg upp í móti avgerðini.

Barnaverndartænasturnar ynskja, at ásetingin verður broytt, soleiðis at tað eisini verður møguligt at seta eitt barn yvir 15 ár í viðgerð eftir stk. 1, nr. 1 uttan barnsins samtykki, eins og tað skal verða møguligt taka barnið úr heiminum við tvingsli, um tann, ið hevur foreldramyndugleikan, setur seg upp í móti avgerðini. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesum.

Heimild er eisini í § 15, stk. 1, nr. 8 hjá barnaverndartænastuni at hjálpa foreldrum at fáa viðgerð í lag, eitt nú rúsevnisviðgerð. Her krevst tó samtykki frá tí, ið skal í viðgerð.

Barnaverndartænasturnar ynskja at fáa heimild at seta eina kvinnu, ið er við barn, í rúsevnisviðgerð uttan hennara samtykki. Hetta fyri at taka atlit til ófødda barnið og tryggja, at tað ikki tekur skaða. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesum.

Í mun til onnur foreldur verður mett, at tað ikki tænir nøkrum endamáli at seta tey í rúsevnisviðgerð uttan samtykki. Um foreldrini ikki vilja fara í viðgerð, kann barnaverndartænastan við teimum ásetingum, sum eru í dag, um treytirnar fyri umsorganaryvirtøku annars eru loknar, seta barnið heiman, um foreldrini halda fram við rúsevnismisnýtsluni.

Um heimild verður givin til at seta børn yvir 15 ár og kvinnur, ið eru við barn, í rúsevnisviðgerð uttan samtykki frá teimum, eigur málið at leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar.

Viðmerkjast skal, at eingi samdøgurstilboð um rúsevnisviðgerð eru til børn í Føroyum. Harafturat eru eingir afturlatnir stovnar til rúsevnisviðgerð, hvørki til børn ella vaksin.

**6.1.2. Familjuviðgerð § 15, stk. 1, nr. 2**

Sambært § 15, stk. 1, nr. 2 kann barnaverndarnevndin seta í verk familjuviðgerð ella líknandi stuðul. Ein slík fyriskipan kann tó bert setast í verk við samtykki frá tí, ið hevur foreldramyndugleikan. Hóast samtykki er fingið, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, um familjuviðgerðin skal fara fram á stovni hjá landinum. Orsøkin er, at ynskt verður, at vald og gjald fylgjast.

Mett verður fyri tað fyrsta, at áseting um familjuviðgerð á stovni hjá landinum, stk. 4, ikki skal vera í § 15, men í staðin flytast til § 33 um stovnar hjá landinum. Tó skal nr. 2 framvegis vera í § 15, stk. 1, soleiðis at barnaverndarnevndin kann seta familjuviðgerð í verk úti í økinum. Á henda hátt verður greiður skilnaður í millum familjuviðgerð uttanfyri stovn hjá landinum og familjuviðgerð á stovni hjá landinum.

Harafturat verður mett, at tað skal verða heimild at krevja, at familjan skal í viðgerð ella til samtalu á stovni hjá landinum, meðan barnið er sett heiman, um mett verður, at tørvur er á hesum. Um familjan noktar, skal hetta tala ímóti at lata barnið heim aftur (prosessuellan skaðavirknað).

Samstundis, sum ásetingin í § 15, stk. 4 verður flutt til § 33, eigur ásetingin at broytast, soleiðis at ein familja kann innskrivast á stovn hjá landinum til familjuviðgerð sum samdøgurstilboð ella dagtilboð.

Landið skal framvegis halda útreiðslurnar fyri familjuviðgerð á stovni hjá landinum, meðan kommunurnar halda útreiðslurnar fyri aðra familjuviðgerð. Aðrar útreiðslur í sambandi við familjuviðgerð, eitt nú fyri mista inntøku, meðan familjan er í viðgerð á stovninum, og ferðaútreiðslur, skal kommunan framvegis halda sambært § 15, stk. 3, tá ið foreldrini ikki sjálvi megna útreiðslurnar. Í hesum sambandi eigur at arbeiðast við at fáa familjuviðgerð viðurkenda sum eina viðgerð, ið gevur rætt til sjúkramelding á sama hátt sum rúsevnisviðgerð, soleiðis at familjan hevur rætt til sjúkradagpening, meðan hon er innskrivað.

Spurningurin um fíggjarligu viðurskiftini hjá familjuni eiga at verða avklárað, áðrenn familjan verður innskrivað á stovn til familjuviðgerð, soleiðis at hesi ikki eru ein forðing fyri viðgerð.

Gigni vísir á, at tað eiga at setast krøv til fakliga førleikan í sambandi við familjuviðgerð ella líknandi stuðul eftir § 15, stk. 1, nr. 2, soleiðis at tað verður tryggjað, at viðgerðin verður framd av viðgera, sum hevur eina góðkenda útbúgving.

Arbeiðsbólkurin er samdur við Gigni í, at ansast skal eftir, at viðkomandi hevur fakligan førleika at veita familjuviðgerð. Trupulleikin er, at tað ikki krevst autorisatión fyri at virka sum familjuviðgeri. Mett verður, at barnaverndartænasturnar við tíðini finna fram til, hvør viðgeri er góður, og hvør er minni góður, til teir ávísu trupulleikarnar.

### 6.1.3. Sosialt frípláss § 15, stk. 1, nr. 4

Við heimild í § 15, stk. 1, nr. 4 kann barnaverndarnevndin veita sosialt frípláss, tá ið tað av sosialum, námsfrøðiligum og fíggjarligum orsøkum verður mett neyðugt, men tá ið fíggjarligt frípláss ikki kann veitast. Barnaverndarnevndin kann, sambært § 15, stk. 2, taka avgerð um, at eitt barn skal á dagstovn ella dagrøkt uttan samtykki frá tí, sum hevur foreldramyndugleikan, um endamálið kann røkkast uttan samtykki.

Í mun til tað fíggjarligu heimildina er greinin ógreitt orðað, og ivi hevur verið um, hvørt foreldrini kunnu verða kravd eftir gjaldi, um barnaverndarnevndin, við heimild í stk. 2, áleggur teimum at lata barnið fara á t.d. dagstovn, t.v.s. uttan samtykki. Viðmerkingarnar til

greinina siga einki um, hvussu er við gjaldi í hesum førum, men útgreinar, at tvær treytir skulu vera loknar, áðrenn sosialt frípláss kann verða veitt:

1. Talan skal vera um ein sosialan trupulleika, antin hjá barninum ella hjá foreldrunum ella onkrum í familjuni, ið ávirkar barnsins heilsu og menning.
2. Foreldrini skulu ikki hava ráð til sjálvi at rinda fyri pláss á dagstovni ella dagrøkt.

Mett verður, at tað eigur ikki at kunna áleggjast foreldrum at rinda fyri sosialt pláss. Sostatt eiga foreldrini at fáa fult frípláss, tá barnið verður sett á dagstovn ella dagrøkt av sosialum orsøkum. Hetta er eisini í samsvari við § 70 a í barnaverndarlógini um foreldragjald, tá børn verða innskrivað á dagstovn hjá landinum.

Um eitt barn verður uppsagt í barnagarði ella dagrøkt orsakað av eftirstøðu, kann barnaverndarnevndin, um tørvur er á tí, veita barninum sosialt frípláss í barnagarðinum ella dagrøktini. Mett verður ikki, at barnaverndarnevndin skal stuðla foreldrunum í at rinda eftirstøðuna fyri "vanliga" plássið. Eftirstøðan eigur heldur at skula viðgerast eftir vanligu reglunum um eftirgevan av skuld til kommunurnar.

**6.1.4. Arbeiðstilboð v.m. § 15, stk. 1, nr. 5**

Barnaverndarnevndin kann, sum ein fyribyrgjandi fyriskipan, hjálpa einum unglinga við t.d. at finna hóskandi arbeiðspláss ella líknandi, um hetta verður mett at vera best fyri unglingan.

Tað er ikki altíð, at unglingin fær løn frá fyritøkuni, sum viðkomandi er í starvi hjá. Í staðin rindar barnaverndartænastan løn til unglingan við heimild í § 15, stk. 3, sbr. § 68. Lønin er tá ikki altíð svarandi til sáttmálaløn.

Spurningurin er, um verandi skipan ikki eigur at broytast, soleiðis at fyritøkan/arbeiðsgevarin rindar unglinganum sáttmálaløn, og síðan fær fulla ella partvísa endurrindan, alt eftir hvussu arbeiðsførleikin er í mun til hetta ávísa arbeiðið. Viðmerkjast skal tó, at um reglur verða gjørdar í hesum sambandi, eiga hesar at gerast í samsvari við forsorgarlógina, soleiðis at reglurnar eru eins á báðum økjum, og eftir teimum leiðreglum, sum Almannastovan nýtir.

Sambært § 15, stk. 3 skulu kommunurnar halda útreiðslurnar, ið standast av stk. 1, sbr. § 68. Hetta hevur við sær, at tað eru kommunurnar, sum skulu halda útreiðslurnar, ið standast av lønarískoytinum.

Um ein unglingi, sum er í einum arbeiðstilboðið við hjálp frá barnaverndarnevndini, verður settur á samdøgursstovn, er spurningurin, hvør skal halda útreiðslurnar í sambandi við arbeiðstilboðið, ímeðan hesin er á stovninum. Tá unglingin er settur heiman, er ikki longur talan um eina fyribyrgjandi fyriskipan eftir § 15 í barnaverndarlógini.

Soleiðis sum samdøgursstovnarnir eru skipaðir í dag, er arbeiðstilboð ikki ein partur av stovnsuppihaldinum, og kann stovnurin tískil ikki halda útreiðslur í hesum sambandi sambært § 69 í barnaverndarlógini, ið er tømandi. Stovnurin kann tískil ikki halda útreiðslur til arbeiðstilboð e.l., hóast eitt arbeiðstilboð verður mett mennandi fyri unglingan og sum ein partur í viðgerðarætlanini. Tískil eru tað kommunurnar, sum mugu halda útreiðslurnar í hesum sambandi.

Mett verður, at tað eigur at verða givin klár heimild til at halda útreiðslur í sambandi við arbeiðstilboð, ímeðan ein unglingi er settur heiman. Heimildin kann antin gevast kommununum ella stovninum. Um heimildin verður givin kommununum, vil hetta hava við sær, at tað er sami myndugleiki, ið heldur útreiðslurnar, óansæð um unglingin er settur heiman – á stovn ella til fosturs – ella ikki. Verður heimildin givin stovninum, vil heimildin verða býtt ímillum myndugleikar, tí stovnurin bert kann rinda í mun til unglinga, ið er innskrivaður á stovnin, og ímeðan hesin er innskrivaður.

Arbeiðstilboð til ung, ið eru sett heiman, eigur altíð at vera skipað í tøttum samstarvi við stovnin og fosturfamiljuna.

Gigni er í móti, at børn arbeiða, serliga børn í undirvísingarskyldigum aldri.

### 6.1.5. Umlætting § 15, stk. 1, nr. 7

Barnaverndarnevndirnar kunnu geva foreldrum tilboð um umlætting. Umlættingin kann vara í 1 – 2 dagar í senn, til dømis vikuskiftisumlætting, og upp til 2 – 3 vikur umlætting í senn, til dømis frítíðarumlætting.

Endamálið er at veita foreldrum, sum vanliga hava eitt gott samband við barnið, men sum ikki hava orku til at ansa barninum alla tíðina, umlætting, soleiðis at tey megna dagligu uppgávuna sum foreldur. Harafturat kann endamálið vera at stuðla foreldrunum í uppalingini av barninum.

Umlættingin kann fara fram hjá fosturforeldrum, á samdøgursstovni ella góðkendum uppihaldsstaði.

Viðmerkjast skal, at í løtuni er einki skipað umlættingartilboð á samdøgursstovni, eins og einki góðkent uppihaldsstað er. Sostatt fer umlætting fram hjá fosturforeldrum.

#### 6.1.5.1. Tá børn eru sett til fosturs

Sambært § 27, stk. 7 kann umlætting eftir § 15, stk. 1, nr. 7 eisini veitast fosturforeldrum.

Fosturforeldrafelagið ynskir, at fosturforeldur fáa skipaða umlætting.

Í dag fáa fosturforeldur umlætting, um Fosturforeldraskipanin metir, at tørvur er á tí. Talan er sostatt ikki um skipaða umlætting til øll fosturforeldur.

Mett verður, at umlætting til fosturforeldur bert eigur at verða veitt, tá talan er um barn við stórum trupulleikum, ið setur serliga stór krøv til fosturforeldrini. Hetta tí tað er umráðandi, at barnið gerst partur av fosturfamiljuni og verður javnsett við tey biologisku børnini í familjuni, t.e. at tey bert verða ansað uttanfyri fosturfamiljuna, tá biologisku børnini í familjuni eisini verða.

Er talan um barn, ið eisini er fevnt av forsorgarlógini, kunnu fosturforeldur søkja um umlætting eftir forsorgarlógini á jøvnum føti við onnur foreldur, og fáa umlætting frá Stuðulsfólkaskipanini fyri børn.

Møguliga kundu ásetingar ella vegleiðing um, nær fosturforeldur hava rætt til umlætting eftir barnaverndarlógini, gjørt tað meira sjónligt, nær talan er um umlættingartørv. Hetta kundi verið samskipað við ásetingum og vegleiðing um umlætting eftir forsorgarlógini.

**6.1.5.2. Tá børn eru sett á samdøgursstovn**

Tá børn eru á samdøgursstovni, er vanligt, at tey hava samveru við foreldrini ella onnur javnan eftir § 22. Tað eru tó nøkur børn, sum eru sett á samdøgursstovn, ið ikki kunnu fara heim til foreldrini ella onnur í nærmastu familju í vikuskiftum og ferium. Í hesum sambandi er spurningur reistur um, hvørt børn á samdøgursstovni kunnu fara til umlætting hjá fosturforeldrum í vikuskiftum og ferium, og hvør skal halda útreiðslurnar, ið standast av hesum.

Soleiðis sum greinin er tulkað, kann umlætting eftir § 15, stk. 1, nr. 7 bert veitast foreldrum og fosturforeldrum – ikki samdøgursstovnum.

Umlætting/uppihald uttanfyri stovnin er, soleiðis sum samdøgursstovnarnir eru skipaðir í dag, ikki ein partur av stovnsuppihaldinum, og kann stovnurin tískil ikki halda útreiðslur í hesum sambandi sambært § 69 í barnaverndarlógini, ið er tømandi.

Spurningurin er, um umlætting hjá fosturforeldrum er ein fyriskipan, ið barnaverndarnevndin kann seta í verk, samstundis sum barnið er innskrivað á samdøgursstovni, ella tað er onnur fyriskipan, sum skal setast í verk, um barnið skal hava uppihald uttanfyri samdøgursstovnin, ímeðan barnið er innskrivað har.

Umlætting er ein fyribyrgjandi fyriskipan, ið skal forða fyri, at barnið verður sett heiman. Hetta talar ímóti, at børn fara til umlætting eftir § 15, stk. 1, nr. 7, meðan tey eru innskrivað á samdøgursstovn. Hinvegin er tað gott fyri barnið at hava samband við onkran uttanfyri stovnin, serliga tá hugsað verður um tíðina, sum kemur, aftaná at barnið er útskrivað av stovninum. Barnið kann hava verið til fosturs, áðrenn tað varð innskrivað á stovnin, og skal møguliga aftur til somu fosturfamilju, tá tað verður útskrivað av stovninum. Hetta talar fyri, at barnið kann hava uppihald hjá eini fosturfamilju í vikuskiftum og í ferium, meðan barnið er innskrivað á samdøgursstovn.

Soleiðis sum barnaverndararbeiðið er skipað í dag, átti ikki at verið nøkur forðing fyri, at barnaverndartænastan rindar fyri uppihaldið hjá "umlættingar-"/fosturfamilju, hóast barnið er innskrivað á stovn. Barnaverndartænastan hevur framvegis ábyrgdina av málinum og skal m.a. framhaldandi arbeiða við biologisku familjuni og stuðla henni í at fáa barnið heim aftur. Eisini vísandi til, at tað í flestu førum er týdningarmikið fyri barnið, at tað hevur tilknýti til persón uttanfyri stovnin. Harumframt er tað barnaverndartænastan, sum í ávísan mun fyriskipar samveru millum biologisku foreldrini, ella onnur, og børn á stovni, og um neyðugt, heldur útreiðslur í hesum sambandi.

Tað tykist órímiligt at krevja, at fosturforeldur hava eitt barn í vikuskiftum og í feriu uttan at fáa samsýning fyri hetta, t.v.s. at javnseta uppihaldið við samveru. Tískil má greið heimild vera fyri, at børn kunnu hava uppihald hjá fosturforeldrum, meðan tey eru innskrivað á samdøgursstovn, ímóti samsýning.

Heimildin kann antin leggjast til samdøgursstovnin, soleiðis at uppihald hjá fosturforeldrum er ein partur av útslúsingini frá stovninum, ella leggjast til barnaverndarnevndina, soleiðis at hetta gerst ein partur av ætlanini fyri barnið. Tað, sum talar fyri at leggja heimildina til samdøgursstovnin, er, at stovnurin kann skipa tað soleiðis, at stovnurin sparir starvsfólk, meðan barnið/børnini eru til umlætting. Hinvegin áliggur tað barnaverndartænastuni at tryggja, at barnið hevur tilknýti og samband við persónar uttanfyri stovnin, meðan barnið er innskrivað, og talar hetta fyri, at heimildin skal liggja hjá barnaverndartænastuni.

### 6.1.6. Fastan persón § 15, stk. 1, nr. 9

Fosturforeldrafelagið vísir á, at tað hevur stóran týdning, at ein kontaktpersónur/umsjónarfólk verður knýtt at barninum og hevur regluligt samband við barnið. Við tí innliti, kontaktpersónurin fær til barnsins tørv/støðu, kann hesin ráðgeva og verða hoyrdur av barnaverndartænastunum í sambandi við, at tær taka avgerðir í málinum.

Mett verður, at tað eigur at umhugsast, um ein óheftur fastur persónur eigur at tilnevnast øllum børnum, ið verða sett heiman, soleiðis at hesin kann hjálpa barninum og tala barnsins sak, eitt nú í sambandi við eftirmeting/uppfylgjan av málinum. Barnið eigur sjálvt at kunna velja, hvør persónurin skal vera, t.d. ein persónur í familjuni ella ein lærari e.l. Hetta tí tað er umráðandi, at barnið hevur álit á persóninum.

Okkara skipan er í dag uppbygd soleiðis, at tað er sosialráðgevin, ið tosar við barnið, og sum eigur at málsviðgera soleiðis, at tað er best fyri barnið.

Harafturat metir arbeiðsbólkurin, at tað eigur at umhugsast eisini at geva foreldrunum rætt til at velja sær ein fastan persón sum stuðul í málinum.

### 6.1.7. Barn kann venda sær ónavngivin til barnaverndartænastuna § 15, stk. 1, nr. 11

Sambært § 15, stk. 1, nr. 11 hava børn rætt til at venda sær ónavngivin til barnaverndartænastuna við sínum trupulleikum. Foreldrini skulu í slíkum førum ikki fráboðast.

Mett verður, at ásetingin ikki eigur at standa í § 15, men heldur eigur at vera ein sjálvstøðug grein, møguliga sum stk. 3 í § 8. Hetta tí talan er um eina meira almenna skipan og ikki sum ein ítøkilig fyriskipan í mun til tað einstaka barnið.

## 6.2. Uppfylgjan av málinum § 16

Tað áliggur barnaverndarnevndini at hava eftirlit við, hvussu barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk, og við jøvnum millumbilum meta um, hvørt ein fyriskipan virkar eftir ætlan.

> § 16. Barnaverndarnevndin skal hava eftirlit við, hvussu barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk.
> *Stk. 2.* Barnaverndarnevndin skal við jøvnum millumbilum meta um, hvørt ein fyriskipan virkar eftir ætlan, og um, hvørt neyðugt er at seta nýggjar fyriskipanir í verk. Um so er, skal barnaverndarnevndin taka stig til, at nýggjar fyriskipanir verða settar í verk.
> *Stk. 3.* Barnaverndarnevndin kann seta heimið undir umsjón við at seta eftirlitsverja í heimið.
> *Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um heimildir og skyldur hjá eftirlitsverjum.

Innkomnu viðmerkingarnar vísa á, at greinin eigur at orðast greiðari, soleiðis at ivi ikki er um, hvat greinin inniber. Víst verður eisini á, at uppfylgjanin ikki er nøktandi, og at krøv skulu setast til, at eftirlitisverjin skal hava eina viðkomandi útbúgving.

Tað er eisini komið fyri, í sambandi við at uppihald á stovni uttanlands skal leingjast, at málið ikki er komið til Almannamálaráðið fyrr enn upprunaliga játtanin er við at ganga út, ella er gingin út. Hetta er ikki nøktandi.

Viðmerkingarnar til greinina vísa á, at hugtakið "at hava eftirlit við" merkir at hava eftirlit við, um ætlanin (smbr. § 47) virkar eftir ætlan. Hetta er bæði í mun til barnið og í mun til foreldrini. Sí um ætlanina undir 10.3. Ætlan í sambandi við eina fyriskipan.

Viðmerkingarnar vísa eisini á, at hugtakið "við jøvnum millumbilum" merkir eitt nú 3. hvønn ella 6. hvønn mánað, alt eftir hvørja fyriskipan talan er um. Mett verður, at tað eigur at ásetast greitt í greinini, at barnaverndarumsitingin, í sambandi við at ein fyriskipan verður sett í verk, innan 3. mánaðir skal meta um, hvørt fyriskipanin fyri barnið virkar ella eigur at broytast, og um ætlanin skal broytast. Eftirfylgjandi skal henda meting gerast, minst 6. hvønn mánað. Í mun til foreldrini skal metingin gerast í minsta lagi 6. hvønn mánað.

Viðvíkjandi eftirlitisverjanum eru uppgávurnar og krøvini til eftirlitisverjan ásett í kunngerð, herímillum at eftirlitisverjin skal so vítt gjørligt hava serligar fyritreytir fyri at kunna útinna starvið. Hvørjar fyritreytirnar skulu vera, má metast um í tí einstaka førinum, í mun til umstøðurnar og hvørja uppgávu eftirlitisverjin skal hava.

Mett verður, at eitt nýtt stykki skal setast inn, sum ásetur, at eitt tilmæli í sambandi við eftirmeting/framleingjan av eini fyriskipan eigur at verða lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina í seinasta lagi 3 mánaðir, áðrenn fyriskipanin endar. Hetta fyri at tryggja, at endalig avgerð kann verða tikin í rímiligari tíð (uml. 1 mánað), áðrenn fyriskipanin endar, soleiðis at partarnir hava tíð at innrætta seg eftir avgerðini.

Annars verður mett, at orðingin í greinini, samanhildið við viðmerkingarnar, er nøktandi og tekur hædd fyri teimum innkomnu viðmerkingunum. Tó kann ein vegleiðing gerast, sum greiðir nærri frá innihaldinum í greinini, soleiðis at eingin ivi er um, hvussu greinin skal umsitast.

Viðmerkjast skal tó, at bert við at fremja eftirlit við málsviðgerðini kann staðfestast, um barnaverndarnevndirnar fylgja ásetingunum í greinini. Í dag er einki skipað eftirlit. Sí í hesum sambandi eisini undir 12. Eftirlit.

### 6.3. Bráðfeingis avgerðir § 17

Sambært § 17 kunnu avgerðir um at taka barnið bráðfeingis út heiminum ikki standa við í meira enn tríggjar mánaðir.

Føroya Barnaheim vísir á, at tey fleiri ferðir hava verið fyri, at børn eru innskrivað í bráðfeingisplássinum longri enn tríggjar mánaðir, og at hetta ikki er nøktandi. Føroya Barnaheim vísir á, at tey síggja eina av orsøkunum vera, at tað er ov langt ímillum fundirnar

hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, tí um avgerð ikki kann takast á einum fundi, kann tað taka upp í ein mánað, áðrenn málið kemur fyri aftur.

Arbeiðsbólkurin er samdur við Føroya Barnaheimi í, at tað ikki er nøktandi, at børn eru innskrivað bráðfeingis longri enn tríggjar mánaðir. Harafturímóti metir arbeiðsbólkurin ikki, at tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, sum dregur málið út – nevndin hevur fund 14. hvønn dag.

Tað eru barnaverndartænasturnar, sum hava ábyrgdina av at upplýsa málið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndini, soleiðis at nevndin kann taka avgerð. Mett verður, at barnaverndartænasturnar eru blivnar betri til at upplýsa málini, og við tíðini blíva enn betur. Mett verður tískil, at tað framyvir verða færri og færri dømi um, at børn eru innskrivað bráðfeingis longri enn tríggjar mánaðir.

Viðmerkjast skal, at ein orsøk til, at málini kunnu draga út, er, at tað tekur ov langa tíð at fáa umbidnu upplýsingarnar aftur frá fakfólki. Eitt uppskot kundi verið at sett eina freist í lógina fyri, hvussu skjótt upplýsingar skulu latast barnaverndartænastuni.

## 6.4. Læknakanning og viðgerð § 18

Í serligum førum kann barnaverndarnevndin uttan rættarúrskurð avgera, at eitt barn skal til hóskandi viðgerð ella kanning uttan samtykki frá tí, ið hevur foreldramyndugleikan.

> **§ 18.** Í teimum førum, har orsøk er at halda, at eitt barn hevur eina lívshóttandi ella álvarsama sjúku ella skaða, er úti fyri blóðskemd ella harðskapi, og um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ikki syrgja fyri, at barnið kemur til kanningar ella viðgerð, kann barnaverndarnevndin uttan rættarúrskurð avgera, at barnið skal til hóskandi viðgerð ella kanning.
> *Stk. 2.* Um barnaverndarnevndin ikki er saman, kann formaðurin ella, tá honum berst frá, næstformaðurin avgera, at barnið skal til hóskandi viðgerð ella kanning sambært stk. 1.
> *Stk. 3.* Avgerðir sambært stk. 1 og 2 skulu skjótast til ber, og innan 2 yrkadagar, leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar.

Gigni vísir á, at tað kundi verið tilskilað, at viðgerð ella kanning er hjá lækna og/ella hjá heilsufrøðingi.

Mett verður, at hetta ikki er neyðugt, tí viðmerkingarnar til greinina vísa á, at við "hóskandi viðgerð ella kanning" er at skilja hjá lækna, sálarfrøðingi, sjúkrahúsi ella øðrum hóskandi viðgerðarstovni.

Eisini vísir Gigni á, at ynskjandi hevði verið, at ein áseting var, sum gav barnaverndarnevndini heimild at áleggja familjum, sum nokta at taka ímóti tænastuni frá heilsufrøðingi, ella ikki loyva barni sínum viðtalu ella kanning hjá heilsufrøðingi, at taka ímóti tænastuni.

Mett verður, at barnaverndarnevndirnar longu hava hesa heimild. Um Gigni metir, at eitt barn livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, eigur Gigni at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Um kanningin av málinum eftir § 45 vísir, at neyðugt er at seta eftirlitisverja í heimið, kann barnaverndarnevndin heita á heilsufrøðing hjá Gigni um at

verða eftirlitisverji, um mett verður, at førleikarnir hjá heilsufrøðinginum eru viðkomandi fyri uppgávuna.

Viðmerkjast skal, at Barnaverndarstova Føroya hevur tilevnað eitt uppskot til mannagongd í sambandi við kynsligan ágang ímóti børnum. Uppskotið er í løtuni til ummælis hjá viðkomandi pørtum.

### 6.5. Yvirtøka av umsorganini fyri barninum

Avgerð um at yvirtaka umsorganina fyri einum barni kann bert takast av Høvuðsbarnaverndarnevndini. § 19 í barnaverndarlógini ásetur, í hvørjum førum Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um umsorganaryvirtøku, og harvið seta barnið heiman. Tað er bert, tá tað verður mett at vera til barnsins besta, at umsorganaryvirtøka kann fremjast eftir § 19, og bert um fyribyrgjandi fyriskipan ikki kann hjálpa barninum.

#### 6.5.1. Umsorganaryvirtøka § 19

Grein 19 er tømandi. Tað er sostatt bert í nevndu førum, at umsorganin fyri einum barni kann yvirtakast.

> **§ 19.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um umsorganaryvirtøku í hesum førum:
> 1) tá ið álvarsom vanrøkt er í mun til dagligu umsorganina fyri barninum,
> 2) um barnið er fyri harðskapi ella øðrum álvarsomum ágangi,
> 3) um líkt er til, at barnsins heilsa ella menning er í álvarsomum vanda vegna foreldranna vantandi umsorgan,
> 4) um barnið hevur misnýtslutrupulleikar, brotsligan atburð ella aðrar álvarsamar sosialar trupulleikar, ella
> 5) um barnið hevur aðrar atferðar- ella tillagingartrupulleikar.
>
> *Stk. 2.* Yvirtøka av umsorganini fyri einum barni sambært stk. 1 skal bert nýtast, um mett verður, at umsorganaryvirtøka er neyðug og best fyri barnið, og tá ið fyribyrgjandi fyriskipanirnar sambært hesi lóg ikki verða mettar at skapa eitt nøktandi úrslit fyri barnið.
>
> *Stk. 3.* Barnaverndarnevndin hevur uppfylgjanina av málinum um hendi sambært § 16.

Gigni ynskir, at hugtakið "álvarsamur ágangur" verður nágreinað. Arbeiðsbólkurin metir, at hetta kann gerast í eini vegleiðing til ásetingina. Tá mál verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina við tilvísing til hesa greinina, verður hugsað um eitt nú kynsligan ágang.

Harafturat ynskir Gigni, at stk. 1, nr. 4 og 5 eisini verða ásett í mun til foreldur. Arbeiðsbólkurin metir, at um foreldrini hava teir trupulleikar, sum eru ásettir í nr. 4 og 5, er fylgjan av hesum, at málið er fevnt av nr. 1 – 3. Tískil verður mett, at neyðugt er ikki at gera fleiri ásetingar um hetta.

Eisini ynskir Gigni, at ein nýggj áseting verður gjørd í mun til, at børn ikki ynskja at fara heim aftur til síni foreldur, orsakað av tí, tey eru fyri heima.

Viðmerkjast skal, at sambært § 44 skal eitt barn, um tað er fylt 12 ár, verða hoyrt, áðrenn ein avgerð verður tikin, og dentur skal leggjast á barnsins ummæli. Barnaverndarumsitingin eigur eisini í málum, har børn eru yngri enn 12 ár, at hoyra børnini, um so er, at tey eru búgvin at hoyra. Hevur barnið fylt 15 ár, er barnið eisini partur í málinum. Tá mál verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, tryggjar nevndin, at ásetingin verður fylgd. Trupulleikin er, tá

ein avgerð hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini gongur út, og barnaverndarnevndin ikki leggur málið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til eftirmetingar. Í slíkum førum er eitt barn, um tað ikki er fylt 15 ár, ikki partur í málinum og kann tískil ikki kæra avgerðina hjá barnaverndarnevndini, um ikki at leggja málið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til eftirmetingar.

Mett verður, at neyðugt er ikki at gera sjálvstøðuga áseting í mun til, at barnið ikki ynskir at fara heim aftur til foreldrini, havandi í huga, at lógin ásetur, at dentur skal leggjast á barnsins ummæli. Harafturímóti eigur § 24 at víðkast, soleiðis at eitt mál um umsorganaryvirtøku skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, eisini tá avgerðin hjá nevndini rennur út, og barnaverndarnevndin metir, at barnið kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum. Hetta fyri at tryggja, at barnið verður hoyrt, og at barnið, um tað skal setast heim aftur, kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum. Eitt slíkt mál skal annars viðgerast eftir vanligu reglunum um (framhaldandi) umsorganaryvirtøku. Galdandi orðing av § 24, stk. 2 hevur við sær, at tá ein avgerð hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini rennur út, verður málið ikki langt fyri nevndina, um barnaverndarnevndin metir, at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan heima.

Vanliga skal, meðan barnið er umsorganaryvirtikið, arbeiðast fram ímóti, at barnið skal heim aftur til foreldrini. Tískil verður ein avgerð um umsorganaryvirtøku vanliga tikin fyri eitt ár í senn. Fosturforeldrafelagið vísir á, at avgerð um umsorganaryvirtøku skal kunna takast fyri eitt longri tíðarskeið enn eitt ár, og at fyri smá børn eigur málið ikki at ganga umaftur, fyrr enn barnið er 3 ár. Fosturforeldrafelagið vísir á, at størri børnini gerast, størri ávirkan hevur tað, at mál verða tikin upp aftur á hvørjum ári – ein afturvendandi ótryggleiki fyri børnini.

Mett verður, at eingin forðing er í galdandi lóg fyri, at ein avgerð um umsorganaryvirtøku kann takast fyri eitt tíðarskeið, sum er longri enn eitt ár. Barnaverndarnevndin hevur skyldu til við jøvnum millumbilum at meta um, hvørt umstøðurnar eru broyttar, soleiðis at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum. Í hesum sambandi skal barnaverndarnevndin, sambært § 24, leggja málið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan, hóast tíðarskeiðið, avgerðin er tikin fyri, ikki er útrunnið. Sostatt eigur eingin vandi at vera fyri, at barnið er umsorganaryvirtikið longri enn neyðugt, hóast avgerðin er tikin fyri eitt longri tíðarskeið enn eitt ár.

Tó verður mett, at tað eigur at ásetast, at eitt mál um umsorganaryvirtøku skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til eftirmetan í seinasta lagi eitt ár eftir, at umsorganaryvirtøkan byrjaði. Eftirfylgjandi skal barnaverndarnevndin leggja málið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina í minsta lagi annað hvørt ár, um Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki ásetur styttri freist. Mett verður, at tað er rættast, at Høvuðsbarnaverndarnevndin fær høvi at kanna, um grundarlag framvegis er fyri umsorganaryvirtøkuni umframt at kanna, at fyriskipanin framvegis tænir endamálinum og er til gagns fyri barnið.

### 6.5.2. Varandi umsorganaryvirtøka § 23

Eru foreldrini varandi ikki før fyri at taka sær av barninum, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð um varandi umsorganaryvirtøku eftir § 23. Greinin er tømandi.

> § 23. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um at taka umsorganina varandi frá

foreldrunum, um:

1) tað má metast at vera sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan, eitt nú vegna rúsevnismisnýtslu ella sálarlig brek,

2) eitt barn verður álvarsliga misrøkt, misnýtt kynsliga ella er fyri álvarsligum sálarligum ella likamligum ágangi ella eyðmýking í heiminum.

*Stk. 2.* Umsorganin kann bert verða tikin varandi frá foreldrunum, um tað ikki er møguligt at seta aðrar og lagaligari fyriskipanir í verk, ella um slíkar fyriskipanir hava verið royndar, men ikki givið úrslit.

Innkomnu viðmerkingarnar vísa á, at tað eiga at gerast broytingar í greinini. Greinin eigur at víðkast, soleiðis at tað verður møguligt at fremja varandi umsorganaryvirtøku, um:

- ein foreldraførleikakanning vísir, at ongi útlit eru fyri, at foreldraførleikin batnar,
- barnið hevur verið til fosturs í longri tíð, t.d. í 5 ár.

Arbeiðsbólkurin tekur undir við, at omanfyri nevndu broytingar verða gjørdar í § 23. Mett verður, at serliga orðingin "sálarlig brek" í stk. 1, nr. 1 í ávísum førum er ein forðing fyri varandi umsorganaryvirtøku, hóast tað er sannlíkt, at foreldrini varandi vanta foreldraførleika. Hetta tí tað ikki altíð er nøkur sálarlig sjúka staðfest (diagnosa). Harafturat verður mett, at tilknýtið hjá barninum til fosturfamiljuna skal hava týdning, tí at barnið oftani hevur størri tilknýti til fosturfamiljuna enn til biologisku familjuna, tá tað hevur verið til fosturs í longri tíð.

### 6.5.3. Samvera § 22

Í sambandi við at eitt barn verður umsorganaryvirtikið, eigur avgerð eisini at takast um samveru millum barnið og foreldrini ella onnur, ið barnið er knýtt at.

Fosturforeldrafelagið vísir á, at eisini í mun til samveru eigur at verða lurtað eftir barninum, soleiðis at barnið ikki skal í samveru, um tað ikki hevur hug til hetta, og at samvera ikki eigur at verða ásett, bert fyri at kyrra foreldrini. Felagið vísir eisini á, at tað hevur stóran týdning fyri menningina hjá nøkrum børnum, at tey ikki verða órógvað av skaðiligari samveru, serliga har foreldrini hava varandi sinnissjúku ella ógvusliga rúsevnismisnýtslu.

Sambært § 22 tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð um, hvussu ofta foreldur skulu hava samveru við barnið. Í hesum sambandi skal atlit verða tikið til barnið. Harafturat gevur barnaverndarlógin Høvuðsbarnaverndarnevndini heimild at nokta samveru, um tað er best fyri barnið. Mett verður tískil, at neyðugt er ikki at gera broytingar í galdandi áseting í mun til viðmerkingarnar hjá Fosturforeldrafelagnum.

Í ávísum málum, har viðurskifti gera, at tað ikki er møguligt at áseta fasta samveru við foreldrini, hevur Høvuðsbarnaverndarnevndin givið barnaverndartænastuni heimild at áseta samveruna. Hetta er t.d. í málum, har pápin siglir úti, og tað tískil ikki er møguligt at siga, júst nær hann er heima, ella har foreldrini hava rúsevnistrupulleikar, og tað tískil er trupult at skipa samveru. Tískil hevur barnaverndartænastan fingið heimild til at áseta, nær samvera skal verða, soleiðis at samvera kann vera, tá hetta er møguligt. Mett verður, at henda heimild eigur at ásetast í lógini.

Sambært § 24, stk. 4 *kann* málið um samverurætt verða endurskoðað í sambandi við nýggja avgerð um umsorganaryvirtøku. Mett verður, at "*kann*" eigur at broytast til "*skal*", soleiðis at málið um samverurætt verður endurskoðað samstundis sum málið um umsorganaryvirtøku. Hetta er í samsvari við galdandi praksis.

Í mun til samveru hevur ivi verið um, hvør hevur ábyrgdina av at skipa samveruna og halda útreiðslurnar í sambandi við samveru. Eisini hevur ivi verið um munin millum samveru eftir barnaverndarlógini og samveru eftir foreldramyndugleikalógini, sum Ríkisumboðið umsitur.

Almannamálaráðið hevur júst gjørt eina vegleiðing um samveru og duldan bústað, í samstarvi við Ríkisumboðið, og verður mett, at vegleiðingin tekur hond um tey ivamál, sum hava verið.

## 7. Fosturforeldraskipanin

Barnaverndarstova Føroya umsitur fosturforeldraskipanina vegna kommununar. Víst verður til álitið "Ein felags hurð", ið hevur viðgjørt spurningin um, hvørt fosturforeldraskipanin eigur at vera ein kommunal uppgáva ella ein uppgáva hjá landinum.

Fosturforeldraskipanin góðkennir fosturforeldur, eisini tá talan er um næstrafólk (netværksfamiljer). Í galdandi ásetingum verður eingin munur gjørdur á krøvunum, ið verða sett til fosturforeldur, ið ikki eru næstrafólk til barnið og tey, ið eru næstrafólk. Mett verður, at nøkur krøv eiga at verða linari, tá talan er um næstrafólk, eitt nú til bústaðarumstøðurnar og aldur.

Tað áliggur fosturforeldraskipanini at fyrireika fosturforeldrini, áðrenn eitt barn verður latið teimum umframt at stuðla, undirvísa og vegleiða tey, meðan barnið er til fosturs. Í hesum sambandi ynskir Gigni, at fosturforeldraskipanin samstarvar við Gigni, soleiðis at Gigni er við til at fyrireika fosturforeldrini. Eisini ynskir Gigni at hava ein leiklut í sambandi við, at eitt barn skal setast varandi til fosturs.

Fosturforeldrafelagið vísir á, at fosturforeldur eiga at verða lærd, hvørji eyðkenni tey serliga skulu leggja merkið til og at verða lærd at samskifta við myndugleikar.

Gigni vísir eisini á, at tær ynskja kunning, tá eitt barn verður sett til fosturs, soleiðis at heilsufrøðingurin í økinum, har barnið er til fosturs, fær kunning um hetta, og kann halda fram við at veita ta tænastu, sum barnið og fosturforeldrini hava rætt til.

Mett verður, at tá talan er um lítil børn og børn við serligum tørvi, eigur Gigni altíð at fáa kunning um, at eitt barn flytur, soleiðis at barnið og fosturforeldur fáa ta tænastu frá Gigni, sum tey hava rætt til. Er talan um eitt størri barn, ið ikki hevur serligan tørv, eigur barnaverndartænastan bert at kunna Gigni, um mett verður, at hetta er neyðugt. Gongur barnið í skúla, verður mett, at Gigni – heilsufrøðingurin á skúlanum – fær kunning um barnið frá skúlanum.

Grein 26, stk. 2, nr. 1 ásetur, at eitt barn kann setast til fosturs, um foreldrini samtykkja. Sambært § 20, stk. 1 kann barnaverndarnevndin avgera, at eitt barn, í mesta lagi tríggjar mánaðir, ikki skal flytast/setast heimaftur. Tó ásetur stk. 3, at ein slík avgerð skal leggjast fyri

Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar skjótast til ber, og innan 2 yrkadagar. Barnaverndartænasturnar vísa á, at ivi kann verða um, hvørt málið skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, um foreldur taka samtykkið til, at eitt barn er sett til fosturs, aftur. Tískil meta barnaverndartænasturnar, at tað helst eigur at verða gjørd ein áseting um, at foreldur ikki kunnu angra tiltak, sum tey upprunaliga góvu samtykki til.

Mett verður ikki, at tað skal gerast ein áseting um, at foreldur ikki kunnu taka samtykkið aftur. Sostatt skulu mál, har foreldur taka samtykkið aftur, framvegis leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar. Um foreldrini taka samtykkið aftur, kann barnaverndarnevndin avgera, at barnið ikki skal heim aftur í upp til 3 mánaðir. Henda avgerð skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina innan 2 yrkadagar sambært § 20, stk. 3. Barnaverndartænastan hevur so 3 mánaðir at arbeiða við eini umsorganaryvirtøku uttan samtykki.

Rætting eigur at gerast í § 29, stk. 2, soleiðis at tað framgongur, at tað er avvarðandi barnaverndartænasta, ið rindar fosturforeldrunum samsýning, og ikki Fosturforeldraskipanin.

## 7.1. Rættindi hjá fosturforeldrum

Sambært § 24, stk. 5 skulu fosturforeldur hoyrast, áðrenn nýggj avgerð viðvíkjandi umsorganaryvirtøku verður tikin. Fosturforeldur eru bert partar í einum máli, tá ið avgerð verður tikin sambært § 20, stk. 1, t.e. har barnaverndarnevndin avger, at barnið í í mesta lagi tríggjar mánaðir ikki skal flytast heimaftur.

Fosturforeldrafelagið ynskir, at fosturforeldur skulu verða hoyrd í øllum málum, tí upáhald kunnu vera, sum fosturforeldur t.d. kunnu avsanna. Eisini ynskir Fosturforeldrafelagið, at fosturforeldur gerast partur í málum, tá børn óbrotið, tó undantikið skipaðari samveru, hava verið 5 ár til fosturs hjá somu fosturforeldrum – og harvið fáa kærurætt. Viðvíkjandi tí at verða partur skal havast í huga, at fosturforeldrini útinna eina uppgávu fyri Fosturforeldraskipanina í eitt avmarkað tíðarskeið. Í hvørjum einstøkum føri verður gjørd ein skrivlig avtala millum fosturforeldrini og Fosturforeldraskipanina um m.a., hvussu leingi ætlanin er, at barnið skal vera til fosturs. Í hesum sambandi skal havast í huga, at arbeitt verður fram ímóti, at barnið skal heim aftur til foreldrini at búgva, um talan ikki er um varandi umsorganaryvirtøku, og at foreldrini framvegis hava foreldramyndugleikan. Mett verður tískil ikki, at fosturforeldur skulu verða partur í málinum.

Í sambandi við hoyring av fosturforeldrum er tað soleiðis, at um barnið framhaldandi skal verða til fosturs, eftir at avtalaða tíðarskeiðið er runnið, eiga fosturforeldrini at verða hoyrd sambært § 24, stk. 5, antin av barnaverndartænastuni, ella um tað verður ynskt, av Høvuðsbarnaverndarnevndini á samráðingarfundinum sambært § 55, í sambandi við at málið verður eftirmett. Til tess at tryggja, at fosturforeldur altíð verða hoyrd, verður mett, at áseting skal gerast um, at Høvuðsbarnaverndarnevndin altíð skal hoyra fosturforeldur, og at tey tískil skulu kallast inn til samráðingarfundin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Sum víst á undir 6.5.2. varandi umsorganaryvirtøka verður mett, at tá børn hava verið til fosturs í 5 ár, eigur at verða møguleiki fyri at taka avgerð um varandi umsorganaryvirtøku. Hóast eitt barn verður sett varandi til fosturs, hava biologisku foreldrini framvegis

foreldramyndugleikan. Tískil verður mett, at fosturforeldur ikki eiga at verða mett sum partur í málinum, men skulu kallast inn til samráðingarfund og hoyrast av Høvuðsbarnaverndarnevndini. Sí eisini undir 13.2. Kærurættur.

Eisini mælir Fosturforeldrafelagið til, at tað í ávísum førum, møguliga við rættaravgerð, átti at verið møguligt at latið barnaverndarnevndunum foreldramyndugleika í eitt avmarkað tíðarskeið við møguleika at leingja tíðarskeiðið. Harafturat vísir Fosturforeldrafelagið á, at tað við hvørt er neyðugt, at lógin gevur møguleika fyri ættleiðing uttan samtykki.

Viðmerkjast skal, at familjurætturin er danskt málsøki. Tískil kann spurningurin um foreldramyndugleika og ættleiðing ikki ásetast í barnaverndarlógini. Vísast kann tó á, at foreldramyndugleikalógin[2] gevur møguleika fyri at flyta foreldramyndugleikan við avtalu, ið er góðkend av Ríkisumboðnum, frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, til onnur enn foreldrini. Møguleiki er sostatt ikki at flyta foreldramyndugleika uttan samtykki[3]. Vísast kann eisini á, at møguleiki er í ættleiðingarlógini[4] at ættleiða eitt barn uttan samtykki, um treytirnar annars eru loknar. Um fosturforeldur ættleiða eitt fosturbarn, fáa fosturforeldrini foreldramyndugleikan yvir barninum. Viðmerkjast skal tó, at hesar heimildirnar eru sera sjáldan brúktar[5]. Tískil er trupult at meta um, hvørt tær áttu at verið broyttar ella ikki.

### 7.2. Samsýning til forsturforeldur

Fosturforeldrafelagið ynskir, at arbeiðsumstøðurnar hjá fosturforeldrum verða normaliseraðar. Á fundi greiddi Fosturforeldrafelagið frá, at tey ynskja at fáa fult endurgjald fyri løn, feriuløn, pensjón v.m., sum tey missa í sambandi við, at tey muga taka farloyvi ella arbeiða niðursetta tíð fyri at vera heima hjá fosturbarninum. Hesum tekur arbeiðsbólkurin undir við; tó soleiðis, at um neyðugt er, at fosturforeldur eru heima hjá einum barni, eiga hesi at vera proffesjonel fosturforeldur. Hetta tí, um fosturforeldur skulu hava endurgjald fyri inntøkumiss umframt samsýning, kann hetta hava við sær, at fosturforeldur við høgari inntøku verða vald frá, orsakað av at tey gerast dýrari enn fosturforeldur við lægri inntøku.

Um "proffesjonel" fosturforeldur verða upprættað, verður mett, at hesi skulu hava løn, feriuløn, pensjón v.m. á sama hátt sum vanligur lønmóttakari.

Arbeiðsbólkurin metir annars, at fosturforeldur skulu fáa samsýning og ikki løn. Hetta tí tað er umráðandi, at eitt barn, sum er til fosturs, følir seg sum part av fosturfamiljuni, og verður javnsett við hini børnini í familjuni. Mett verður, at um fosturforeldur fáa løn og verða javnsett við vanligar lønmóttakarar, kann hetta forða fyri, at barnið følir ser sum part av fosturfamiljuni.

Fosturforeldraskipanin arbeiðir við at fáa praksis viðvíkjandi ásetan av samsýning eins um alt landið. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesum og metir, at tað eigur at verða gjørd ein vegleiðing um, hvussu samsýningin til fosturforeldur skal ásetast – hvat skal til, fyri at fáa samsýning faldað við 2, 3 o.s.fr., soleiðis at praksis verður eins um alt landið.

---

[2] Anordning nr. 228 frá 15. marts 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær.
[3] Uttan við dómi.
[4] Anordning nr. 1169 frá 25. november 2006 om ikrafttræden for Færøerne af lov om adoption, som ændret ved anordning nr. 398 af 20. april 2010.
[5] So vítt arbeiðsbólkurin veit.

### 7.3. Fosturforeldrafelagið

Fosturforeldrafelagið vísir á, at nógv fosturforeldur sakna ráðgeving frá felagnum. Í hesum sambandi vísir felagið á, at felagið eigur at fáa fíggjarligar umstøður at veita ráðgeving og ymisk tiltøk, eitt nú fyri fosturbørn og skeið fyri fosturforeldur. Fosturforeldrafelagið skjýtur upp, at tað verður álagt kommununum at gjalda 1,5% út yvir lønina hjá fosturforeldrum til Fosturforeldrafelagið.

Fosturforeldrafelagið er eitt privat áhugafelag, ið ikki er álagt nakrar skyldur eftir barnaverndarlógini. Harafturímóti áliggur tað fosturforeldraskipanini m.a. at vegleiða og undirvísa fosturforeldrum. Tískil verður mett, at tað ikki skal áleggjast kommununum at gjalda til Fosturforeldrafelagið. Um felagið ynskir at veita ráðgeving v.m., má felagið sjálvt finna fígging til hetta virksemið, eitt nú við limagjaldi.

Viðmerkjast skal tó, at einki er til hindurs fyri, at Fosturforeldrafelagið og Fosturforeldraskipanin samstarva um t.d. skeið o.l.

## 8. Stovnar

Landsstýrismaðurin setur á stovn og rekur samdøgursstovnar sambært § 33 í barnaverndarlógini. Nærverkið umsitur samdøgursstovnarnar. Víst verður til álitið "Ein felags hurð", ið m.a. hevur viðgjørt spurningin um, hvørt tað eigur at vera ein landsuppgáva ella kommunal uppgáva at reka samdøgursstovnar, og spurningin um, hvørji tilboð eiga at verða skipað í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin vil tó vísa á, at tað mangla tilboð í Føroyum, m.a. mangla tilboð um útslúsing og eftirvernd, herímillum tilboð til børn í 15 ára aldri ella eldri, sum ikki hava tørv á viðgerð, men sum ikki vilja/kunnu fara heim til foreldrini at búgva (ungdómsbýli). Eisini eigur at umhugsast at seta á stovn ein tryggjaðan stovn (sikret institution).

### 8.1. Serdagstovnur hjá landinum

Sum álitið "Ein felags hurð" vísir á, verður serdagstovnurin til børn ikki brúktur.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað eigur at umhugsast at skipa serdagstovnin sum ein part av Familjudeplinum, soleiðis at børnini í familjum, sum eru til familjuviðgerð, fara á dagstovnin, meðan foreldrini eru í sjálvstøðugari viðgerð.

Serdagstovnurin kann eisini móttaka onnur børn, sum uppfylla treytirnar fyri at verða innskrivað, hóast familjan ikki er innskrivað til familjuviðgerð.

Eisini kundi serdagstovnurin verið brúktur, bæði av barnaverndartænastunum og Ríkisumboðnum, í sambandi við at samvera millum foreldur og børn skal verða undir umsjón.

### 8.2. Rættindi undir búsitan á stovni

Blákrossheimið vísir á, vísandi til § 39 um rættindini undir búsitan á stovni, at lógin átti eisini positivt at nevnt, hvørji rættindi barnið hevur, herímillum at barnið hevur rætt til at mennast, fáa hjálp og vegleiðing, førleikar og umsorgan.

Mett verður, at m.a. endamálsorðingin í barnaverndarlógini lýsir, at børnini hava henda rættin. Vísast kann eisini á, at endamálið hjá samdøgursstovnunum er ásett í reglugerð fyri stovnin.

Gigni vísir á, at allar orðingarnar viðvíkjandi valdsnýtslu og verju av børnunum eftir § 39 eiga at dagførast. Gigni metir, at avgerðir viðvíkjandi einum barni, sum er til ampa fyri seg sjálvan ella onnur, ikki eiga at verða tiknar av einum persóni. Harafturat vísir Gigni á, at í sambandi við valdsnýtslu eigur barnið at hava ráðgeva, sum tryggjar, at alt er farið rætt fram v.m.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað ikki ber til at áseta, at tað skula vera fleiri persónar, sum taka avgerð, hetta tí talan er um bráðfeingis støðu, og tað kann vera, at bert eitt starvsfólk er nærhendis. Harafturat verður ásett í kunngerðini um valdsnýtslu o.a. á samdøgursstovnum v.m. fyri børn og ung, at øll valdsnýtsla skal fráboðast, umframt at eftirlit skal verða við, at stovnarnir vera riknir sambært kunngerðini. Mett verður, at hesar ásetingar eru nøktandi.

Viðvíkjandi ráðgeva til barnið verður mett, at um ein áseting verður gjørd um, at øll børn, sum eru sett heiman, skulu hava tilknýti til ein fastan persón, sum víst á undir 6.1.6. Fastan persón, kann hesin persónurin virka sum ráðgevi hjá barninum í sambandi við møguliga valdsnýtslu.

Annars skal viðmerkjast, at tey undantøk, sum § 39, stk. 3 áleggur landsstýrismanninum at nágreina í kunngerð, ikki svara til orðingina í § 39 sum heild. Tískil eigur orðingin í stk. 3 at broytast, so heimildin verður rætt orðað. Harafturat ásetur kunngerðin um valdsnýtslu o.a. á samdøgursstovnum v.m. fyri børn og ung m.a., at fráboðan um valdsnýtslu og neyðverju skal sendast Almannastovuni, umframt at Almannastovan hevur eftirlit við, at samdøgurstovnarnir verða riknir sambært kunngerðini. Hetta eigur at rættast til Nærverkið.

## 9. Avgerðarmyndugleiki í fyriskipanum

Avgerðarmyndugleikin er býttur millum barnaverndarnevndirnar og Høvuðsbarnaverndarnevndina.

### 9.1. Fyribyrgjandi fyriskipanir

Grein 9 ásetur, í hvørjum málum barnaverndarnevndin hevur heimild at taka avgerð.

> § 9. Barnaverndarnevndin tekur avgerð í málum, har samtykki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og einum barni, ið hevur fylt 15 ár, tó undantikið í málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku og samverurætti, sbr. §§ 19, 22, 23 og 24 og viðvíkjandi § 15, stk. 4. *Stk. 2.* Harumframt tekur Barnaverndarnevndin avgerð í málum sambært § 15, stk. 2, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1, § 20, stk.1 og § 21, stk. 2 uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan.

Greinin ásetur, at barnaverndarnevndin tekur avgerð í málum um fyribyrgjandi fyriskipanir, har samtykki fyriliggur. Tó kann barnaverndarnevndin sambært § 15, stk. 2 seta ávísar fyribyrgjandi fyriskipanir í verk, hóast samtykki ikki fyriliggur frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan.

Eisini kann barnaverndarnevndin taka bráðfeingis avgerð um at taka eitt barn úr heiminum sambært § 17, stk. 1, og avgerð um læknakanningar og viðgerð sambært § 18, stk. 1, umframt avgerð um, at eitt barn í í mesta lagi tríggjar mánaðir ikki skal flytast/setast heimaftur sambært § 20, stk. 1. Hesar avgerðir skulu tó leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar.

Harafturat kann barnaverndarnevndin sambært § 21, stk. 2, tá eitt barn er sett heiman, lata umsorganarábyrgdina av barninum upp í hendurnar á fosturforeldrunum ella stovninum, har barnið býr.

Fosturforeldrafelagið ynskir, at fleiri avgerðir áttu at ligið hjá barnaverndarnevndini. Hetta er umrøtt undir 3. Umsiting av barnaverndarmálum.

### 9.2. Yvirtøka av umsorganini

Grein 11 ásetur, í hvørjum málum heimildin at taka avgerð er hjá Høvuðsbarnaverndarnevndin.

> § 11. Landsstýrismaðurin setur eina Høvuðsbarnaverndarnevnd til at taka avgerð í málum, har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og einum barni, ið hevur fylt 15 ár, tó undantikið § 15, stk. 2, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1 og § 20, stk. 1.
> *Stk. 2.* Harumframt tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð í málum viðvíkjandi rætti til ókeypis umboðan, sbr. § 57, stk. 3, í øllum málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku og samverurætti, sbr. §§ 19, 22, 23 og 24, í málum um familjuviðgerð og dagstovnatilboð á stovnum hjá landinum, sbr. § 15, stk. 4.
> *Stk. 3.* Barnaverndarnevndin leggur mál fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8.

Greinin ásetur, at Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð í øllum málum, har samtykki ikki fyriliggur, tó undantikið § 15, stk. 2, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1 og § 20, stk. 1. Harafturat tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð í øllum málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku og samverurætti, málum um rætt til ókeypis umboðan, og mál um familjuviðgerð og dagstovnatilboð á stovni hjá landinum.

Um broytingar verða gjørdar í mun til avgerðarmyndugleika, muga broytingar gerast í § 11.

#### 9.2.1. Inn- og útskrivan á stovn

Tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið inn- og útskrivar[6] børn og familjur á stovnar hjá landinum, sambært § 35 og 15, stk. 4. Í sambandi við at børn skulu setast á stovn uttanlands, krevst tó loyvi frá landsstýrismanninum sambært § 33, stk. 3.

> § 35. Tá ið avgjørt er, at eitt barn skal á ein samdøgursstovn, áliggur tað Høvuðsbarnaverndarnevndini at seta barnið á rættan samdøgursstovn. Hetta verður gjørt í samráð við avvarðandi barnaverndartænastu og leiðaran av samdøgursstovninum.
> *Stk. 2.* Barnið kann ikki útskrivast fyri ásettu tíðina uttan góðkenning frá Høvuðsbarnaverndarnevndini

Soleiðis sum § 35 er orðað, kann greinin skiljast soleiðis, at tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, sum finnur stovnin til barnið. Hetta er ikki í samsvari við

[6] Bert tá talan er um útskriving fyri ásettu tíðina.

málsviðgerðarreglurnar, ið áleggja barnaverndartænastuni at lýsa málið. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur bert avgerð í málinum. Tá Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð um at innskrivað eitt barn á stovn hjá landinum, tekur nevndin avgerð eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini. Høvuðsbarnaverndarnevndin finnur ikki stovnin til barnið, men tryggjar sær, at tann stovnurin, sum barnaverndarnevndin mælir til, at barnið verður innskrivað á, er ætlaður børnum við teimum trupulleikum, barnið hevur, og at stovnurin vil taka ímóti barninum. Um Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki tekur undir við tilmælinum hjá barnaverndarnevndini, má barnaverndarnevndin finna annan stovn ella fyriskipan, og leggja málið fyri av nýggjum.

Orsøkin til ógreiðu orðingina er helst, at tað í uppruna lógaruppskotinum, sum var lagt fyri Løgtingið, var álagt Barnaverndarstovu Føroya at seta barnið á rætta samdøgursstovn. Í sambandi við at Barnaverndarstova Føroya varð gjørd til ein felagskommunalan stovn, og tískil ikki skuldi reka samdøgursstovnarnar, ið skuldu verða landsstovnar, bleiv "Barnaverndarstovan" broytt til "Høvuðsbarnaverndarnevndin". Á tann hátt varð avgerðarmyndugleikin hjá landinum.

Vísandi til, at upprunaliga ætlanin var, at tað var tann myndugleiki, sum umsitur og rekur samdøgursstovnarnar, ið skuldi tryggja, at barnið kom á rætta samdøgursstovn, og at tað hevur verið ivi um, hvør uppgávan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini er í mun til at finna stovn til barnið, verður mett, at greinin eigur at orðast greiðari, soleiðis at tað kemur fram, at Høvuðsbarnaverndarnevndin einans tekur avgerð eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini.

Mett verður, at tað eigur at vera ein tilvísingarbólkur[7], sum tekur støðu til, hvar rætta plássið er til barnið, grundað á tann fakliga førleikan, sum stovnarnir hava í mun til tørvin hjá barninum. Niðurstøðan hjá tilvísingarbólkinum skal verða partur av tilmælinum, sum barnaverndarnevndin leggur fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Tilvísingarbólkurin skal verða mannaður við umboðum frá stovnunum og Barnaverndarstovu Føroya. Harafturat skal viðkomandi sosialráðgevi luttaka. Leiðarin fyri tann myndugleikan, sum umsitur og rekur samdøgursstovnarnar, er formaður í tilvísingarbólkinum.

Tá einki nøktandi stovnspláss er í Føroyum, kann landsstýrismaðurin, sambært § 33, stk. 3, geva loyvi til, at barnið verður sett á stovn uttanlands.

> § 33, *stk. 3.* Í serligum førum, tá ið talan er um sera trupul børn, ið ikki kunnu fáa nøktandi stovnspláss í Føroyum, kann landsstýrismaðurin loyva, at børn verða sett á stovn uttanlands.

Arbeiðsbólkurin ivast í, hví henda ásetingin er í lógini. Tað hevur ikki eydnast arbeiðsbólkinum at finna grundgevingina fyri hesi ásetingini.

Mett verður, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur fakligu førleikarnar at meta um, hvørt tilmælta plássið er rætta tilboðið til barnið. Landsstýrismaðurin hevur ikki somu førleikar. Harafturat leingjur tað um málsviðgerðina av málinum, at málið skal til landsstýrismannin til góðkenningar. Tískil verður mett, at § 33, stk. 3 eigur at strikast, soleiðis at Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka endaliga avgerð, eisini tá børn skulu á stovn

[7] Arbeiðið við at skipa ein tilvísingarbólk er byrjað.

uttanlands. Viðmerkjast skal, at tað er avvarðandi barnaverndartænasta, ið ger avtalu við útlendska stovnin um at taka ímóti barninum, og hvat innihaldið í uppihaldinum skal vera. Avtalan er viðløgd tilmælinum til Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Eisini eigur føroysk kunngerð at gerast um viðurskiftini millum føroysku og donsku myndugleikarnar, tá barn verður sett á stovn í Danmark av føroyskum myndugleikum, svarandi til donsku kunngerðina[8] "om besøgsrejsende og ophold i Danmark og Færøerne i tilbud i boformer". Heimild er í § 79 í barnaverndarlógini at gera slíkar ásetingar í kunngerð.

Til tess at landsstýrismaðurin kann fylgja við í, hvussu nógv børn verða sett á stovn uttanlands og hví, kann landsstýrismaðurin áleggja Høvuðsbarnaverndarnevndini at senda honum frágreiðing hesum viðvíkjandi hálva hvørt ár.

Greinarnar 36 og 37 geva heimild at seta børn við álvarsomum atferðartrupulleikum á ymiskar viðgerðarstovnar, herímillum orsakað av rúsevnismisnýtslu. Í hesum sambandi skal vísast á, at Almannamálaráðið ikki varðar av stovnum, sum viðgera fyri rúsevnismisnýtslu, og mett verður ikki, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur heimild at innskriva børn á stovnar, sum aðrir myndugleikar varða av. Sostatt kann eitt barn bert innskrivast á hesar stovnar eftir avtalu við stovnarnar. Somu trupulleikar gera seg galdandi í mun til útgreining av børnum. Hesir trupulleikarnir eiga at verða tiknir upp og loystir, soleiðis at børn og ung kunnu verða sett á stovn til avrúsing og útgreining.

Grein 37 gevur heimild at seta børn við álvarsomum atferðartrupulleikum á stovn uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, ella frá barninum. Orsakað av, at eingir tryggjaðir stovnar eru í Føroyum til børn og ung, verður mett, at tað ikki tænir nøkrum endamáli at seta børn á stovn uttan samtykki. Ein opin samdøgursstovnur kann ikki halda einum barnið aftur í longri tíð. Tískil verður greinin vanliga ikki brúkt. Hóast greinin ikki verður brúkt, verður mett, at hon framhaldandi skal vera í lógini, soleiðis at møguleiki er at nýta heimildina. Samstundis verður mett, at tað eigur at umhugsast at seta á stovn ein tryggjaðan stovn.

## 10. Málsviðgerð hjá barnaverndartænastunum

Barnaverndartænasturnar umsita barnaverndarmálini og hava málsviðgerðina um hendi. Hetta inniber, at tað eru barnaverndartænasturnar, ið hava ábyrgdina av at kanna mál, at seta neyðugar fyriskipanir í verk, fylgja málunum upp v.m.

### 10.1. Kanning av málinum § 45

Um rímilig orsøk er at halda, at eitt barn hevur tørv á, at fyriskipan verður sett í verk, skal barnaverndarumsitingin kanna málið. Endamálið við kanningini er at finna fram til, um ein fyriskipan skal setast í verk, og um so er, hvør fyriskipan so skal setast í verk. Kanningin er grundarlagið undir avgerðini hjá barnaverndarnevndini.

Fyri at tryggja, at kanningin verður grundað á eina heildarmeting, verður mett, at tað eigur at ásetast í greinini, at kanningin í minsta lagi skal fevna um barnsins:

[8] Bek. nr. 1388 af 12/12/2006.

1) menning og atferð,
2) familjuviðurskifti,
3) skúlaviðurskifti,
4) heilsuviðurskifti,
5) frítíðarviðurskifti og vinskap, og
6) onnur viðkomandi viðurskifti.

Harafturat verður mett, at tað skal ásetast, at barnaverndarumsitingin í sambandi við kanningina skal lýsa styrkir og trupulleikar hjá barninum, familjuni og sosiala trygdarnetinum rundan um barnið. Er talan um ung, ið hava fylt 15 ár, skal kanningin eisini lýsa, um tað verður mett, at tann ungi hevur tørv á eini fyriskipan, eisini eftir at tann ungi hevur fylt 18 ár, og um so er, hvør fyriskipan talan er um.

Fosturforeldrafelagið vísir á, at tað eigur at ásetast í lógini, at børn, sum eru sett heiman, ikki kunnu setast heim aftur, uttan so at ein foreldraførleikakanning er gjørd.

Barnaverndarstova Føroya og barnaverndartænasturnar ynskja, at Høvuðsbarnaverndarnevndin skal kunna avgera, um ein foreldraførleikakanning skal gerast uttan samtykki. Samstundis verður ynskt, at um foreldur nokta at medvirka til eina slíka kanning, skal hetta hava við sær, at tað verður lagt til grund, at tey ikki hava nøktandi foreldraførleika (prosessuellan skaðavirknað). Barnaverndartænasturnar vísa á, at hetta er serliga viðkomandi í málum, har innkomnu upplýsingarnar frá serkønum fólki eru mótsigandi.

Partur av arbeiðsbólkinum tekur undur við ynskinum frá barnaverndartænastunum, meðan partur av arbeiðsbólkinum ivast í, um tað tænir nøkrum endamáli at áleggja eina foreldraførleikakanning uttan samtykki. Tó er arbeiðsbólkurin samdur um, at barnaverndartænasturnar eiga at fáa heimild at kanna og upplýsa málið til fulnar uttan samtykki. Mett verður, at tað skal kannast nærri, hvør heimild er best egnað at nøkta tørvin hjá barnaverndartænastunum til at fáa málini kannað og lýst til fulnar.

Harafturat tekur arbeiðsbólkurin undir við, at í málum, har umsorganaryvirtøka er framd, og ivi er um foreldraførleikan, skal Høvuðsbarnaverndarnevndin kunna taka avgerð um, at barnið ikki kann setast heim aftur, uttan so at ein foreldraførleikakanning staðfestir, at foreldrini hava foreldraførleika.

Gigni vísir á, at tað hevði verið gott við tíðarásetingum í §§ 45 og 49 í staðin fyri "skjótast til ber" og "sum skjótast". Eisini ynskir Gigni, at § 45, stk. 4 verður broytt, soleiðis at kanningin fyrst og fremst skal taka atlit til barnið.

Arbeiðsbólkurin skal vísa á, at § 49 ásetur, at kanningin skal gerast í seinasta lagi innan tríggjar mánaðir eftir, at ein fráboðan er innkomin, ella at barnaverndarnevnd av sínum eintingum hevur tikið eitt mál upp til kanningar. Í serligum førum kann tíðarfreistin viðvíkjandi eini kanning vera seks mánaðir. Harafturat er ásett, at barnaverndarnevndin skal taka avgerð í einum máli í seinasta lagi tvær vikur eftir, at ein kanning er gjørd. Sostatt verður mett, at galdandi áseting er nøktandi.

Eisini skal vísast á, at § 45, stk. 4 ikki forðar fyri, at atlit verður tikið til barnið, men ásetur, hvussu kanningin fer fram og vavi av kanningini. Tað er gjøgnumgangandi í lógini, at atlit altíð skal takast til barnið, og at barnsins áhugamál skulu takast fram um alt annað. Tískil verður mett, at ásetingin ikki eigur at broytast.

Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini vísir á, at málini frá barnaverndartænastunum eru betri upplýst í dag, enn tey vóru fyrr. Tískil verða færri mál send aftur til barnaverndartænasturnar at verða betur upplýst, áðrenn tey verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Umframt at ein áseting, sum omanfyri nevnt um, hvat kanningin sambært § 45 skal umfata, vil verða medvirkandi til, at málini verða betur upplýst, verður mælt til, at Høvuðsbarnaverndarnevndin og Almannamálaráðið gera greiða vegleiðing um, hvørjar upplýsingar skulu fyriliggja í málum um umsorganaryvirtøku, soleiðis at málini frá byrjan verða upplýst nøktandi. Hetta vil eisini medvirka til at gera málsviðgerðina meira eins um alt landið.

**10.2. Samstarv við foreldrini § 46**

Barnaverndarlógin ásetur í § 46, at upplýsingar um málið í størst møguligan mun skulu innheintast í samstarvi við tann, ið málið snýr seg um.

Gigni spyr, hvat "størst møguligan mun" merkir og vísir á, at mál verða drigin út, tá foreldrini nokta. Fosturforeldrafelagið vísir eisini á, at atburðurin hjá biologisku foreldrunum hevur við sær, at neyðugar avgerðir vera drignar óneyðuga langt út.

Sambært viðmerkingunum til greinina skal orðingin "í størst møguligan mun" skiljast soleiðis, at upplýsingar í størst møguligan mun skulu útvegast í samstarvi við foreldrini. Hetta er sostatt høvuðsreglan, men um barnaverndarumsitingin metir, at tað gongur ov nógv út yvir barnið at samstarva við foreldrini, skal barnaverndarumsitingin tó útvega upplýsingar uttan hetta samstarv. Barnsins áhugamál skulu takast fram um alt annað.

Sostatt kann barnaverndartænastan taka avgerð um at innheinta upplýsingar uttan foreldranna samtykki. Ein slík avgerð er ein fyrisitingarlig avgerð, ið kann kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum sambært § 65, stk. 1. Sambært stk. 2 verður ein slík avgerð ikki freistað, um hon verður løgd fyri Kærunevndina, t.v.s. at kæran fær ikki steðgandi virkna. Kærunevndin kann tó taka avgerð um, at avgerðin skal freistast.

Sum viðmerkingarnar til greinina eisini vísa á, so vísa kanningar, at tann besta loysnin fyri barnið sum oftast verður funnin í samstarvi við foreldrini. Um foreldrini ikki samstarva, ávirka tey sjálvi barnið til ikki at trívast í fyriskipanini, sum verður sett í verk. Tískil er umráðandi at royna at fáa samstarv í lag við foreldrini.

Barnverndarumsitingin má tískil í hvørjum einstøkum máli meta um, hvørt tað tænir endamálinum at samstarva við foreldrini, ella um hetta gongur útyvir barnið. Samstarv við foreldrini má tó ikki verða ein forðing fyri at seta eina fyriskipan í verk.

Almannastovan/skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini skjýtur upp, at heimild verður fingin fyri at brúka mediatión í teimum truplastu málunum til at finna semju barninum at frama. Arbeiðsbólkurin tekur undir við, at møguleiki fyri mediatión eigur at umhugsast, tí tað er best fyri barnið, um samstarv er við foreldrini.

Barnaverndartænasturnar vísa á, at tær meta, at mediatión kann verða ein hóskandi fyriskipan, men meta ikki, at tað er hóskandi við mediatión, meðan málið verður viðgjørt á fundi í Høvuðsbarnaverndarnevndini. Mediatión skal heldur roynast, áðrenn málið verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

**10.3. Ætlan í sambandi við eina fyriskipan § 47**

Áðrenn ein fyriskipan verður sett í verk, skal ein ætlan gerast fyri barnið.

> § 47. Áðrenn fyriskipanir verða settar í verk, skal barnaverndarumsitingin gera eina skrivliga ætlan fyri barnið, sum verður løgd fyri barnaverndarnevndina til støðutakan.
> *Stk. 2.* Ein meting má gerast av, hvør fyriskipan er tann besta fyri barnið, og útgreinast má, hvør ætlanin er við fyriskipanini.
> *Stk. 3.* Tá ið ein fyriskipan verður sett í verk, skal barnaverndarumsitingin gera eina tíðaravmarkaða ætlan fyri fyriskipanina, sum verður løgd fyri barnaverndarnevndina.

Endamálið við greinini er at tryggja eitt ávíst framhald við tilboðnum. Barnið fær ta bestu hjálpina, um ein greið ætlan er fyri, hvør fyriskipan verður sett í verk, og hvør orsøkin er til at seta fyriskipanina í verk.

Nærverkið vísir á, at tær skrivligu ætlanirnar, ið skulu leggjast fyri barnið, áðrenn tað verður umsorganaryvirtikið, eru sera ymiskar. Eisini vísa teirra royndir, at tann tíðaravmarkaða ætlanin, ið skal gerast sambært stk. 3, tá ið ein fyriskipan er sett í verk, ikki verður gjørd. Nærverkið vísir á, at hesar ætlanir hava stóran týdning fyri, at stovnurin kann leggja eina virkisætlan fyri uppihaldið hjá barninum, og mælir tí til, at greinin verður broytt, soleiðis at tað verður ásett, hvat ein tílík ætlan skal innihalda, og at tað verður lýst, hvør munurin er millum ætlanirnar sambært stk. 1 og stk. 3.

Gigni eftirlýsir eina ætlan fyri heimið fyri at fyrireika eina møguliga heimkomu hjá barninum, soleiðis at barnið ikki kemur aftur til tað sama, sum tað fór frá.

Sambært viðmerkingunum til greinina skal tað fyrst gerast ein skrivlig ætlan, har útgreinað verður, hvat ætlanin er við fyriskipanini. Síðan skal ein tíðaravmarkað ætlan gerast, tá fyriskipanin er sett í verk. Útgreinast skal millum annað, hvørja hjálp foreldrini skulu fáa, og hvat foreldrini skulu gera fyri at varðveita foreldramyndugleikan. Harumframt skal ein virkisætlan gerast fyri barnið, tá ið talan er um at seta barnið heiman.

Sambært viðmerkingunum til § 36 um innskrivan á samdøgursstovn skal barnaverndartænastan senda Barnaverndarstovu Føroya (sum upprunaliga skuldi reka samdøgursstovnarnar)[9] eina frágreiðing um barnið. Ein ætlan skal gerast fyri umsorganarligu støðuna hjá barninum. Ætlanin skal ikki broytast, uttan so at fyritreytirnar fyri henni eisini eru burtur. Ein meting skal gerast um, hvussu leingi barnið skal verða á staðnum, og um tað er ynskiligt, at barnið hevur samband við foreldrini. Í frágreiðingini skal verða sagt frá, hví

[9] Hetta má við verandi bygnaði skiljast sum ávikavist Nærverkið, Føroya Barnaheim og Fosturforeldraskipanin.

barnaverndarumsitingin mælir til antin stovn, upplæringar- ella viðgerðarstovn. Somuleiðis má ein meting gerast av, um stovnurin, har barnið skal búgva, er fakliga førur fyri at bjóða barninum nøktandi hjálp í mun til endamálið við uppihaldinum á stovninum. Frágreiðingarnar og ætlanirnar skulu leggjast fyri barnaverndarnevndina til støðutakan, áðrenn tilfarið verður latið Barnaverndarstovu Føroya.

Mælt verður til at broyta ásetingina, soleiðis at tað greitt verður ásett, hvørja ætlan barnaverndartænastan skal gera, og hvat ætlanin skal innihalda. Í hesum sambandi verður mælt til, at ætlanin skal innihalda eina frágreiðing um endamálið við fyriskipanini, og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at náa endamálinum. Ætlanin skal taka støði í § 45-kanningini. Ætlanin skal, í mun til tey viðurskifti, sum eru lýst í kanningini, seta ítøkilig mál í mun til barnsins trivna og menning í samsvari við yvirskipaða endamálið við fyriskipanini. Tá talan er um at seta eitt barn heiman – til fosturs ella á samdøgursstovn – skal ásetast, hvørji viðurskifti hjá barninum uppihaldið uttanfyri heimið skal bøta um, herímillum um tað eru trupulleikar hjá barninum ella hvørt tað er sambandið við foreldrini, sum eru orsøkin til, at barnið skal setast heiman. Harafturat skal tað ásetast, hvat skal gerast í mun til trupulleikarnar. Ætlanin skal eisini áseta, hvør fyriskipan skal setast í verk fyri familjuna, meðan barnið er sett heiman, umframt mál og lutmál í hesum sambandi. Tað er umráðandi, at ætlanin er so neyv sum gjørligt, soleiðis at tað er møguligt at eftirmeta fyriskipanina, bæði í mun til um málið er rokkið, ella um onnur fyriskipan skal setast í verk.

## 11. Mál, ið viðvíkja fleiri barnaverndarøkjum

Meginreglan er, at tað er tað barnaverndarøkið, har tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, búgva, ið hevur ábyrgd av og heimild til at fylgja við í eini fyriskipan, til endamálið er rokkið.

Foreldur kunnu tó flyta innanlands í Føroyum ella til útlandið, bæði áðrenn og aftaná ein fyriskipan er sett í verk.

Eisini kann eitt barn verða statt í Føroyum, antin einsamalt ella saman við foreldrunum, uttan at foreldrini eru skrásett at búgva í Føroyum, t.d. sum ferðafólk.

### 11.1. Flyting innanlands

Gigni spyr, hvør fylgir við, tá ein familja flytur úr einum øki í annað, og hvussu er, tá ein fleirfaldað samansett familja flytur, og tey búgva í ymiskum bygdum kring landið. Gigni vísir á, at tað hevði verið sera gott at fingið leiðreglur um hesi viðurskifti.

Tá ein familja flytur, eigur familjan at melda flyting hjá Landsfólkayvirlitinum. Barnaverndartænastan hevur eftirlit við familjuni/barninum, tá ein fyriskipan er sett í verk. Sostatt er tað barnaverndartænastan, sum fylgir við, um ein familja flytur úr einum øki í annað.

Flytur familjan, eigur tann barnaverndarnevndin, sum familjan flytur frá, at boða tí barnaverndarnevnd, sum familjan flytur til, frá. Hendan yvirtekur síðan málið, um annað ikki verður avtalað.

Um tey, ið hava foreldramyndugleikan, búgva í tveimum ymiskum barnaverndarøkjum, er tað tann barnaverndarnevnd, har tann, sum í veruleikanum fremur foreldramyndugleikan, býr, ið hevur ábyrgdina av málinum.

Mett verður, at ásetingarnar í lógini eru greiðar, og at neyðugt er ikki at gera broytingar. Tó kunnu vegleiðingar gerast, soleiðis at eingi ivamál eru.

**11.2. Flyting til útlandið**

Almannamálaráðið er komið eftir, at mál, har tann, ið hevur foreldramyndugleikan, er fluttur uttanlands, eftir at ein fyriskipan er sett í verk í Føroyum, framhaldandi verða viðgjørd í Føroyum, uttan at barnaverndarnevndin hevur boðað útlendska myndugleikanum frá.

Sambært § 62 eigur barnaverndarnevndin í Føroyum at boða avvarðandi myndugleika uttanlands frá, um tann, ið hevur foreldramyndugleikan, flytur uttanlands. Sambært viðmerkingunum til greinina skal barnaverndartænastan, um útlendski myndugleikin ynskir tað, senda allar viðkomandi upplýsingar til myndugleikan, sum frameftir skal taka sær av málinum. Barnaverndarnevndin í Føroyum hevur sostatt, sum meginregla, ikki heimild at taka endaliga avgerð í málinum, eftir at tann, ið hevur foreldramyndugleikan, er fluttur uttanlands. Mett verður, at § 58, stk. 2 eisini er galdandi í mun til útlendskar myndugleikar, og at tað tí kann avtalast, at barnaverndarnevndin í Føroyum framvegis skal hava ábyrgd av og heimild til at fylgja við í fyriskipanini og rinda útreiðslur í hesum sambandi, inntil endamálið er rokkið.

Mál hava verið, har donsku kommunurnar hava avvíst at móttaka málið, um ikki tann føroyska kommunan gevur endurgjaldstilsøgn. Hetta tí donsku kommunurnar meta, at føroysku kommunurnar, hóast tann, ið hevur foreldramyndugleikan, er fluttur til Danmarkar, framvegis hevur gjaldsskyldu í málinum. Hetta skyldast helst, at sambært donsku reglunum heldur tann kommuna, ið hevur sett eina fyriskipan í verk, fram við at hava gjaldskyldu, hóast tann, ið hevur foreldramyndugleikan, flytur til aðra kommunu. Donsku reglurnar á økinum eru ikki galdandi í Føroyum, og kunnu tískil ikki brúkast í sambandi við flyting millum londini.

Almannamálaráðið hevur havt fund við danska almannamálaráðið um viðurskiftini. Á fundinum kom fram, at donsku kommunurnar hava skyldu til at móttaka málið, tá tann, sum hevur foreldramyndugleikan, flytur. Føroyingar hava lógligt uppihald í Danmark, tá tey flyta, og hava tískil rætt til tænastur eftir donsku servicelógini.

Barnaverndartænasturnar heita á Almannamálaráðið um at gera sítt til, at avtalur koma í lag við danskar kommunur, so at føroysku umsitingarnar kunnu vera tryggar við, at tann rættarstøða, sum í seinastuni er staðfest í avgerð hjá donskum kærumyndugleika, verður fráboðað út til donsku kommunurnar.

Almannamálaráðið metir, at ráðið ikki kann fráboða nakað til donsku kommunurnar, men ráðið kann heita á danska almannamálaráðið um at kunna donsku kommunurnar um rættarstøðuna. Annars metir Almannamálaráðið, at barnaverndarnevndirnar kunnu kæra mál, har donsku kommunurnar ikki vilja móttaka málini uttan endurgjaldstilsøgn. Á tann hátt verður rættarstøðan staðfest.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað skulu gerast vegleiðing og mannagongdir í sambandi við flyting úr Føroyum, soleiðis at barnaverndarnevndirnar vita, hvussu tær skulu bera seg at seg í slíkum málum.

### 11.3. Barnið statt í Føroyum

Er eitt barn statt í Føroyum, ið hevur tørv á hjálp, og býr tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, uttanlands, hevur tann barnaverndarnevnd, har barnið er statt, heimild at taka avgerð um fyribils fyriskipan, um treytirnar annars eru loknar. Barnaverndarnevndin skal síðan boða avvarðandi myndugleika frá avgerðini og grundarlagnum undir avgerðini, og eigur hesin myndugleiki at yvirtaka málið, um annað ikki verður avtalað.

Kann barnaverndarnevndin ikki fáa upplýsingar um, hvar tann ella tey ið hava foreldramyndugleikan, búgva, kann barnaverndarnevndin taka avgerð um endaliga fyriskipan.

Er barnaverndarnevndin í iva um, hvørt avvarðandi útlendski myndugleiki yvirheldur grundleggjandi mannarættindi, og barnaverndarnevndin tískil er stúrin fyri at lata avvarðandi myndugleika ábyrgdina av barninum, má barnaverndarnevndin kunna taka avgerð um endaliga fyriskipan, men skal tó boða avvarðandi útlendskum myndugleika frá avgerðini og grundarlagnum undir avgerðini.

### 11.4. Ósemja § 63

Sambært § 63 tekur Barnaverndarstovna Føroya avgerð um, hvør barnaverndarnevnd eigur málið, um ósemja er um, hvør barnaverndarnevnd skal taka avgerð í málinum.

Barnaverndarstova Føroya og barnaverndartænasturnar mæla til, at greinin verður broytt, soleiðis at tað greitt verður tilskilað, at greinin snýr seg um viðurskifti millum føroyskar barnaverndarnevndir og ikki um viðurskifti millum føroyskar og danskar myndugleikar.

Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesum. Ósemja millum føroyskar og danskar myndugleikar eigur at liggja hjá einum kærumyndugleika. Sambært donsku kunngerðini "om besøgsrejsende og ophold i Danmark og Færøerne i tilbud i boformer" er Ankestyrkelsen kærumyndugleiki. Verður líknandi kunngerð gjørd í Føroyum, eigur at umhugsast, um Kærunevndin í almanna- og heilsumálum skal vera kærumyndugleiki. Hetta má gerast í samráð við danska almannamálaráðið, soleiðis at myndugleikarnir í londunum eru samdir um, nær eitt mál skal kærast til ávikavist Ankestyrelsen og Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

## 12. Eftirlit

Sambært § 40 og § 67 hevur landsstýrismaðurin eftirlit við stovnunum og eftirlit við, um kommunurnar og Barnaverndarstova Føroya fylgja ásetingunum í lógini og teimum reglum, ið eru ásettar við heimild í lógini.

Barnaverndarstova Føroya, barnaverndartænasturnar og Nærverkið vísa á, at eftirlitið ikki verður røkt. Blákrossheimið vísir á, at umsitingin av lógini eigur at verða eftirmett. Gigni spyr, hvussu eftirlitið verður skipað.

Ásannast má, at eftirlitið hjá landsstýrismanninum ikki verður røkt. Eisini manglar ein kunngerð um eftirlit.

Tað verður staðiliga mælt til, at ein kunngerð um eftirlit verður tilevnað, og at fólk verður sett til burturav at fremja eftirlitið, bæði í mun til samdøgursstovnarnar og í mun til kommunurnar og Barnaverndarstovu Føroya (serliga Fosturforeldraskipanina).

Bert við at fremja eftirlit er møguligt at finna fram til, um barnaverndarlógin verður fylgd. Harafturat verður mett, at við at fremja eftirlit skerpast málsviðgerðin á barnaverndartænastunum og umsitingini/viðgerðini á stovnunum og Fosturforeldraskipanini, eins og eftirlitið er við til at tryggja, at málsviðgerðin og umsitingin av lógini verður eins um alt landið.

## 13. Kærumøguleiki

Avgerðir tiknar eftir barnaverndarlógini kunnu kærast av teimum, sum hava kærurætt. Alt eftir hvør hevur tikið avgerðina, kann kærast til Føroya Rætt ella Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

### 13.1. Kærumyndugleiki § 64 og § 65

Sambært § 64 kunnu avgerðir, tiknar av Høvuðsbarnaverndarnevndini, og góðkenningar sbrt. § 17, bráðfeingis avgerðir, og § 18, læknakanningar og viðgerð, leggjast fyri Føroya Rætt.

Føroya Rættur hevur upplýst[10], at 6 avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini eru lagdar fyri Føroya Rætt. Av hesum eru trý mál afturkallað, meðan dómur er avsagdur í trimum málum. Tveir av dómunum staðfesta avgerðina hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini um umsorganaryvirtøku[11], meðan ein dómur ógildar avgerðina hjá nevndini um varandi umsorganaryvirtøku[12], men staðfestir umsorganaryvirtøku og samveru undir eftirliti. Hesin seinast nevndi dómurin er lagdur fyri Eystara Landsrætt, ið staðfesti avgerðina hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini[13].

Sambært § 65 kunnu tær avgerðir, ið § 64 ikki fevnir um, kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

Kærustovnurin hevur upplýst[14], at 11 mál eru løgd fyri Kærunevndina í almanna- og heilsumálum eftir § 65 í barnaverndarlógini. Av hesum eru tvey mál burturfallin, og tvey eru avvíst. Málini, sum eru avvíst, eru avvíst við tí grundgeving, at Kærunevndin ikki er rætti kærumyndugleiki. Sí eisini undir 13.1.1. Ivamál um hvør er rætti kærumyndugleiki. Kærunevndin hevur staðfest avgerðina í fimm málum, broytt avgerðina í einum máli og heimvíst eitt mál til nýggja viðgerð. Staðfestu avgerðirnar eru um at nokta eftirskúlauppihald hjá tannáringi, at nokta støkum uppihaldara fíggjarligan stuðul til longt barnsburðarfarloyvi, at barnaverndartænastan avvísti mál, har søkt varð um fíggjarligan stuðul til ansing av

[10] Við skrivi dagfest 27. september 2010.
[11] Ein av hesum dómunum er lagdur fyri Eystara Landsrætt, ið staðfesti dómin hjá Føroya Rætti.
[12] Føroya Rættur metti ikki, at grundarlag var fyri at siga, at foreldrið varandi ikki kundi geva barninum/børnunum nøktandi umsorgan.
[13] Ein nýggj foreldraførleikakanning varð gjørd.
[14] Við telduposti 19. oktober 2010.

tveimum børnum, meðan foreldrini vóru á Ríkissjúkrahúsinum við yngsta barninum, at nokta fríppláss á dagstovni, og at játta 50% fríppláss á dagstovni (sama mál varð fyrr heimvíst til nýggja viðgerð). Í avgerðini, sum varð broytt, varð kært um, at barnaverndartænastan ætlaði at gera kanning av viðurskiftum hjá kæraranum ímóti hansara vilja.

### 13.1.1. Ivamál um, hvør er rætti kærumyndugleiki

Tað hevur víst seg í ávísum málum at vera ógreitt, hvønn myndugleika, persónar skulu kæra til.

Trý mál, ið eru kærd, eru avvíst. Av hesum er eitt kært til Løgtingsins Umboðsmann og tvey til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Kæran til Løgtings Umboðsmann er um krøvini, sum barnaverndartænastan setur til eitt foreldur, fyri at viðkomandi kann fáa økta samveru við barnið. Løgtingsins Umboðsmaður vísir á, at hon ikki kann viðgera kæruna, fyrr enn kært er til Høvuðsbarnaverndarnevndina, sum tekur avgerð í málum um samverurætt. Í hesum sambandi vil arbeiðsbólkurin vísa á, at Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki er ein kærumyndugleiki, og tískil ikki viðgerð kærur.

Tann eina kæran til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum er um avgerð hjá barnaverndarnevndini[15] um at nokta at broyta samverutíðir. Henda kæra var avvíst við tí grundgeving, at málið hoyrir undir málsøkið hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, og Kærunevndin tískil ikki hevur myndugleika at viðgera málið.

Hin kæran er um avgerð hjá Barnaverndartænastuni um noktan av innliti í mál um umsorganaryvirtøku og samveru. Kærunevndin vísir á, at nevndin ikki er kærumyndugleiki í málum, har Høvuðsbarnaverndarnevndin er avgerðarmyndugleiki.

Í mun til innlit er trupulleikin, at Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki altíð hevur øll skjøl, sum barnaverndartænastan hevur, og sum innlit verður ynskt í. Samstundis er Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki ein kærumyndugleiki.

Í mun til krøv í sambandi við samveru skulu avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini kærast til Føroya Rætt. Er talan um, at ein barnaverndartænasta noktar at leggja eitt mál um samveru fyri nevndina til nýggja eftirmetan, áðrenn avgerðin rennur út, er spurningurin, hvør er kærumyndugleiki. Eitt foreldur kann ikki sjálvt leggja mál um samverurætt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Ein, ið hevur foreldramyndugleikan, kann heita á Høvuðsbarnaverndarnevndina um at taka mál um varandi umsorganaryvirtøku upp til nýggja viðgerð, og kann í hesum sambandi leggja málið um samverurætt fyri nevndina.

Mælt verður til, í samráð við avvarðandi myndugleikar, at fáa greina ivamál um, hvør er kærumyndugleiki, og at gera eina vegleiðing um, hvørjar avgerðir skulu kærast til hvønn kærumyndugleika.

---

[15] Barnaverndarnevndin hevði tikið avgerð í november 2005. Henda avgerðin var í desember 2005 kærd til Almannastovuna, sum avvísti kæruna, vísandi til at foreldrið ikki hevði kærurætt smb. § 7, stk. 3 í barnaforsorgarlógini, sum var galdandi til 1. januar 2006. Avgerðin hjá Almannastovuni var kærd til Kærunevndina í februar 2006.

**13.2. Kærurættur § 66**

Sambært § 66 hava tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, børn, ið hava fylt 15 ár, og avvarðandi barnaverndarnevnd rætt til at kæra avgerðir tiknar sambært barnaverndarlógini. Fosturforeldur hava rætt til at kæra avgerðir tiknar sambært § 20, stk. 1, § 27, § 29, stk. 1 og § 31, stk. 1.

Sambært § 468a, stk. 4 í rættargangslógini eru foreldur og børn, ið hava fylt 15 ár, partar í málinum. Sostatt kann ein barnaverndarnevnd ikki leggja eina avgerð hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini fyri Føroya Rætt, hóast ásetingina í § 66 í barnaverndarlógini.

Barnaverndartænasturnar ynskja at hava støðu sum partur og rætt til at leggja avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini fyri Føroya Rætt eftir rættargangslógini § 468a, stk. 4. Hetta er serliga viðkomandi í málum/spurningum av prinsipiellum týdningi (dómsmál), formleikavillum o.l.

Viðmerkjast skal, at hesin spurningur varð viðgjørdur í sambandi við, at barnaverndarlógin varð tilevnað. Tá vísti Præsidenten fyri Eystara Landsrætt á, at hann metti ikki, at tað var rætt, at barnaverndarnevndin var partur í einum máli, hetta vísandi til, at samanhildið við § 11, stk. 3 og § 52, stk. 5 má barnaverndarnevndin metast sum ein "umsiting", ið hevur rætt til at vera umboðað, tá Høvuðsbarnaverndarnevndin viðgerð eitt mál. Præsidenten vísti eisini á, at tað neyvan kann vera ætlanin, at barnaverndarnevndin skal kunna leggja eitt mál, har foreldrini hava fingið viðhald, fyri Føroya Rætt.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað kann vera óheppið, at barnaverndartænastan ikki kann fáa roynt eina avgerð hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, og mælir til, at Almannamálaráðið setur seg í samband við røttu myndugleikarnar fyri at finna eina loysn.

Fosturforeldrafelagið ynskir, at fosturforeldur eru partar í málum, har børn óbrotið, tó undantikið skipaðari samveru, hava verið 5 ár til fosturs hjá somu fosturforeldrum – og harvið fáa kærurætt. Sum víst á undir 7.1. Rættindi hjá fosturforeldrum, verður mett, at fosturforeldur ikki eiga at vera partar í slíkum málum. Um fosturforeldrini ynskja tað, kunnu tey søkja um at ættleiða barnið, og harvið fáa foreldramyndugleikan yvir barninum.

## 14. Uppalingarískoyti § 70 og § 71

Tá eitt barn er sett heiman, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin avgera, at tann, ið hevur uppihaldsskylduna mótvegis barninum, skal gjalda eitt uppalingarískoyti. Eisini kann Høvuðsbarnaverndarnevndin avgera, at eitt barn, sum hevur fylt 15 ár, skal gjalda eitt uppalingarískoyti.

Rættin til uppalingarískoyti hevur tann myndugleiki, sum heldur útreiðslurnar av barninum, meðan tað er sett heiman, t.e. antin barnaverndartænastan ella landið.

Almannastovan og Høvuðsbarnaverndarnevndin vísa á, at greinarnar eiga at gerast einfaldari at umsita. Greinarnar krevja nógva orku at umsita, samstundis sum upphæddin er lutfalsliga lítil, og tað tískil ikki loysir seg at umsita greinarnar.

Eisini vísir Høvuðsbarnaverndarnevndin á, at hon metir ikki, at spurningurin um uppalingaríiskoyti eigur at leggjast fyri nevndina. Hetta tí nevndin ikki hevur serligan førleika á hesum øki, og at spurningurin annars einki hevur við málið um umsorganaryvirtøku at gera.

Enn er eingin avgerð tikin um uppalingaríiskoyti. Barnaverndartænasturnar vísa á, at tað er trupult at fáa neyðugu upplýsingarnar um inntøkuna hjá foreldrunum, eins og tað darvar samstarvinum við foreldrini, um tey skulu áleggjast at rinda uppalingaríiskoyti, tá barnið er sett heiman.

Gigni vísir á, at § 71 eigur at strikast vísandi til, at Gigni er ímóti, at børn arbeiða. Harafturat vísir Gigni á, at eitt barn, sum er 15 ár, er í undirvísingarskyldugum aldri.

Mett verður, at greinarnar eiga at strikast. Um undirtøka ikki er fyri at strika greinarnar, eiga tær at gerast einfaldar at umsita, t.d. soleiðis at uppalingaríiskoyti frá foreldrum verður álagt sambært lógini um rættarstøðu barnanna. Hetta hevur við sær, at øllum foreldrum verður álagt at rinda vanliga barnagjaldið óansæð inntøku, og teimum, sum hava høga inntøku, verður álagt at rinda hækkað barnagjald.

## 15. Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar av barnaverndarlógini

Við barnaverndarlógini eru uppgávurnar og fíggingin á økinum býtt millum land og kommunur, soleiðis at tann myndugleiki, sum tekur avgerð, heldur útreiðslurnar, og vald og gjald harvið fylgjast. Tó rinda barnaverndartænasturnar brúkaragjald til landið í sambandi við, at tær brúka stovnarnar hjá landinum, og tá børn verða sett á stovn uttanlands.

Harafturat er uppalingaríiskoytið, ið, sum víst á undir 14. Uppalingaríiskoyti, kann áleggjast foreldrum og børnum, ið hava fylt 15 ár, ein partur av fíggingini av barnaverndarøkinum.

Í sambandi við at lógaruppskotið varð lagt fyri Løgtingið, varð gjørd ein meting av fíggjarligu og umsitingarligu avleiðingum av uppskotinum.

### 15.1. Fíggjarligu avleiðingarnar

Hagtølini niðanfyri vísa mettu og faktisku fíggjarligu avleiðingarnar av barnaverndarlógini.

| Útreiðslur | Mett í uppskotinum[16][17] | Faktisk tøl 2009 |
|---|---|---|
| Barnaverndarfyriskipanir – kommunalar útreiðslur | 21.786 tkr.[18]<br>- 9.360 tkr.[19] fosturforeldrasamsýning<br>- 1.446 tkr. sosialt fríplass<br>- 8.454 tkr. stuðlar<br>- 2.526 tkr. onnur tiltøk | 29.064 tkr.[20]<br>- 14.015 tkr. fostur-/umlættingarskipanin<br>- 7.738 tkr. § 15 fyriskipanir<br>- 7.310 tkr. |

[16] Metingarnar eru gjørdar út frá 2004-tølum/2004-støði.
[17] Viðmerkjast skal, at broytingar blivu gjørdar í lógaruppskotinum, sum kunnu hava ávirkan á mettu útreiðslurnar.
[18] Útreiðslur í 2003.
[19] Uttan útreiðslur til vistarhald og lummapengar.
[20] Tøl frá hagtalsfrágreiðingini hjá Barnaverndarstovu Føroya.

| | | stovnsútreiðslur |
|---|---|---|
| Barnaverndarnevndir | 979 tkr. | 512 tkr. |
| Barnaverndarumsiting | 5.500 tkr.[21] | 9.900 tkr. |
| Barnaverndarstovan og fosturforeldraskipanin | 2.343 tkr.[22] | 2.800 tkr.[23] |
| Høvuðsbarnaverndarnevndin | 731 tkr.<br>- 96 tkr. (nevndin)<br>- 635 tkr.[24] (skrivstovan) | 1.112 tkr.[25]<br>- 260 tkr. (nevndin)<br>- 852 tkr. (skrivstovan) |
| Eftirlit hjá landsstýrismanninum | 393 tkr. | 0 kr. |
| Ókeypis umboðan | Uml. 180 tkr.<br>– 30 mál árliga (tvingsil og umsorganyvirtøka) | 107.227 kr.[26] |

### 15.2. Umsitingarligar avleiðingar

Umsitingarligu avleiðingarnar av barnaverndarlógini vórðu, at kommunurnar skuldu hava umsitingina av barnaverndarmálum um hendi umframt av Barnaverndarstovu Føroya, ið eisini umsitur fosturforeldraskipanina. Í hesum sambandi mugu kommunurnar hava starvsfólk at umsita málini umframt starvast á Barnaverndarstovu Føroya.

Hinvegin skuldu landsmyndugleikarnir seta á stovn Høvuðsbarnaverndarnevndina umframt framvegis umsita samdøgursstovnarnar.

Hagtølini niðanfyri vísa mettu og faktisku starvsfólkaorkuna í sambandi við umsitingarligu avleiðingarnar av barnaverndarlógini. Samdøgursstovnarnir og Familjudepilin eru ikki tiknir við[27].

| Umsiting | Mett í lógarupskotinum | Faktiskt í 2009 |
|---|---|---|
| Barnaverndarnevndir | Í mesta lagi 11 nevndir<br>- 5 limir í hvørjari nevnd | 10 nevndir<br>- 3 – 7 limir í hvørjari nevnd |

[21] Útreiðslur til høli, rakstur og stovnan eru ikki íroknaðar.
[22] Stovningarkostnaður ikki íroknaður.
[23] Útreiðslurnar vóru 3.200 kr., men harav fóru 400 tkr. til SSP-ráðgevingina.
[24] Stovningarkostnaður ikki íroknaður.
[25] Tøl frá Leiðslukunningarskipan landsins.
[26] Tal frá ársfrágreiðingini hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.
[27] Samdøgursstovnarnir eru ikki viðgjørdir í hesi frágreiðing. Harafturat eru stovnarnir settir á stovn, áðrenn barnaverndarlógin kom í gildi, og hevur lógin í sær sjálvum ikki havt avleiðingar fyri samdøgursstovnarnar.

| | | |
|---|---|---|
| Barnaverndarumsitingin | Umleið 19 fulltíðarstørv<br>- 1 fakfólk pr. 775 børn<br>- 31.12.2003: 14.796 børn undir 19 ár. | 24 fulltíðarstørv[28]<br>- 01.01.2010: 13.535 børn undir 19 ár.[29] |
| Barnaverndarstovan og fosturforeldraskipanin | 4,5 starvsfólk, umframt skrivstovufólk, t.d.:<br>- løgfrøðing,<br>- samfelagsfrøðing,<br>- sosialráðgeva,<br>- sálarfrøðing,<br>- umframt skrivstovufólk<br><br>(faklig hjálp, vegleiðing og ráðgeving til barnaverndartænasturnar, umsita fosturforeldra-skipanina umframt útbúgva og vegleiða fosturforeldur) | 2 starvsfólk, umframt skrivstovufólk<br>- ein sálarfrøðing,<br>- ein sosialráðgeva,<br>- eitt skrivstovufólk |
| Høvuðsbarnaverndarnevndin | Nevndin:<br>- 3 limir fasta mðr. samsýning<br>Skrivstovan:<br>- 1 løgfrøðingur<br>- ¾ skrivstovufólk | Nevndin:<br>- 3 limir fasta mðr. samsýning<br>Skrivstovan:<br>- 1 samskipari (løgfrøðingur)<br>- ¾ fulltrúi |
| Eftirlit hjá landsstýrismanninum | 1 starvsfólk | 0 starvsfólk |

Viðvíkjandi starvsfólkatali á barnaverndartænastunum skal viðmerkjast, at tað er trupult at gera talið neyvt upp, tí starvsfólk á nøkrum barnaverndartænastum eisini arbeiða á sosialu deild, onkur arbeiðir meira enn starvið er normarað til, og flestu leiðarar á barnaverndartænastunum eisini eru leiðarar á sosialu deild. Viðmerkjast skal, at skrivarar og bókhaldarar eru taldir við.

## 16. Orðalagið og allýsingar í lógini

Blákrossheimið vísir á, at orðalagið í lógini og viðmerkingunum kundi verið betri, tí orðingin í ávísum førum stigmatiserar barnið. T.d. hugtakið "sera trupul børn" átti heldur at verið "børn við ella í sera stórum trupulleikum".

[28] Almannamálaráðið hevur hin 13. januar 2011 ringt til barnaverndartænasturnar at vita, hvussu nógv starvsfólk eru.
[29] Sambært Hagstovu Føroya.

Eisini ynskir Blákrossheimið, at hugtakið "umsorgan" verður allýst, soleiðis at allir partar, sum vara av økinum, hava somu hugsan um hugtakið.

Gigni vísir á, at t.d. hugtakið "heilsa" eigur at allýsast til "likamliga, sálarliga og sosiala heilsu".

Barnaverndarumsitingarnar meta, at heitið "barnavernd-" hevur negativar assosiatiónir við sær. Umsitingarnar ynskja tískil, at heitið verður broytt til t.d. "barnaumsiting" ella "barnatænasta".

Mett verður, at orðingarnar í lógini eiga at broytast, soleiðis sum Blákrossheimið vísir á. Harafturímóti verður mett, at neyðugt er ikki at lýsa ymisku hugtøkini í sjálvari lógini, men at hetta heldur kann gerast í vegleiðing til lógina. Í sambandi við at hugtakið "heilsa" verður lýst, skal markamótið mótvegis sjúkrahúsviðgerð lýsast, soleiðis at tað greitt kemur fram, hvør viðgerð er fevnd av barnaverndarlógini, og hvør viðgerð er fevnd av sjúkrahúslógini.

## 17. Verður endamálið rokkið

Tað er trupult at siga, um endamálið við barnaverndarlógini verður rokkið, tí tað er trupult at máta, um børn og ung eru, sum liva undir viðurskiftum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning, uttan at fáa hjálp. Um tað við vissu skal sigast, um endamálið verður rokkið, er neyðugt at granska á økinum – og tað hevur arbeiðsbólkurin ikki orku til.

Barnaverndarlógin fevnir, mótsett barnaforsorgarlógini[30], bert um børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning. Børn, ið bera brek, eru tó eisini fevnd av barnaverndarlógini, um tey liva undir viðurskiftum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning. Barnaforsorgarlógin fevndi eisini um sjálvt brekið hjá børnum, ið bera brek, umframt trivnaðin hjá børnum í kommununi sum heild. Tískil er trupult at sammeta nýggju lógina við tí gomlu.

Ávís hagtøl fyriliggja eftir nýggju barnaverndarlógini. Hesi kunnu m.a. lýsa, hvussu nógv mál eru eftir barnaverndarlógini, hvussu nógv mál eru um umsorganaryvirtøku, hvussu ofta ókeypis umboðan er játtað v.m.

Fyrsta hagtalsfrágreiðingin hjá Barnaverndarstovu Føroya er fyri 2009. Sambært hesi hagtalsfrágreiðing vóru 752 barnaverndarmál skrásett í 2009 [31]. Hetta tal fevnir um bæði mál, har barnaverndarnevndin sjálv hevur tikið avgerð, og mál, sum eru løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar.

Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur gjørt ársfrágreiðingar fyri øll árini, nevndin hevur virkað, t.e. fyri árini 2006 – 2009[32]. Tó skulu tølini fyri 2006 takast við fyrivarni, tí hetta var fyrsta árið, lógin virkaði, og ikki øll mál vórðu løgd fyri nevndina fyrsta árið, eins og ætlanin var.

---

[30] Barnaforsorgarlógin – lov for Færøerne om børneforsorg – varð sett úr gildi við barnaverndarlógini.
[31] Hagtalsskrásetingin er skipað soleiðis, at hvørt barnið sær er skrásett sum eitt mál. Hetta merkir, at ein familja kann verða skrásett sum fleiri barnaverndarmál í skipanini, um stuðul verður veittur fleiri børnum í somu familju.
[32] Ársfrágreiðingin fyri 2010 er ikki liðug enn.

Talvan niðanfyri vísir talið av børnum, ið Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur tikið avgerð um gjøgnum árini, býtt á aldur.




| | 0-3 ár | 4-6 ár | 7-11 ár | 12-14 ár | 15-17 ár | 18-21 ár |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 4 | 7 | 8 | 7 | 12 | 0 |
| 2007 | 4 | 2 | 16 | 15 | 25 | 3 |
| 2008 | 11 | 5 | 13 | 18 | 16 | 1 |
| 2009 | 14 | 7 | 16 | 11 | 18 | 2 |

Talvan vísir, at mál viðvíkjandi 68 børnum vóru løgd fyri nevndina til støðutakan í 2009. Í 2007 og 2008 var talið ávikavist 65 og 64. Sostatt er samlaða talið á leið tað sama hesi árini. Harafturímóti er talið viðvíkjandi ymisku aldursbólkunum nakað óstøðugt. Serliga er talið viðvíkjandi børnum 0 – 3 ár væl hægri í 2008 og 2009, enn tað var undanfarna ár, meðan talið viðvíkjandi børnum 15 – 17 ár er væl lægri í 2008 og 2009, enn tað var í 2007.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógv av málunum vóru nýggj mál, og hvussu nógv vóru eftirmetingar.




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|
| Eftirmeting | | 22 | 32 | 43 |
| Nýggj mál | 38 | 43 | 32 | 25 |

Sum talvan vísir, var av teimum 68 børnum, ið Høvuðsbarnaverndarnevndin tók avgerð um í 2009, í 43 førum talan um børn, ið frammanundan vóru kend av nevndini. Í 25 førum var talan um børn, hvørs mál á fyrsta sinni vórðu lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina í 2009. Talvan vísir eisini, at talið av nýggjum málum hevur verið minkandi árini 2007 – 2009. Viðmerkjast kann, at í lógaruppskotinum varð mett, at umleið 30 nýggj mál fóru at verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina árliga.

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð í málum:

- har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan,
- um familjuviðgerð á stovnum hjá landinum, sbr. § 15, stk. 1, nr. 2 sbr. § 15, stk. 4,
- um dagstovnatilboð á stovnum hjá landinum, sbr. § 15, stk. 4,
- um bráðfeingis avgerð, sbr. § 17, stk. 2,
- um læknakanning uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, sbr. § 18, stk. 2,
- um yvirtøku av umsorganini fyri einum barni, sbr. § 19,
- um forboð viðvíkjandi flyting av einum barni, tá ið tað er sett heiman, sbr. § 20, stk. 3,
- um samverurætt, sbr. § 22,
- um varandi umsorganaryvirtøku, sbr. § 23,
- um setan úr gildi avgerð um umsorganaryvirtøku, sbr. § 24,
- um setan á stovn, sbr. § 35,
- um afturhald á stovni uttan egi samtykki, sbr. § 37, og
- um rætt til ókeypis umboðan, sbr. § 57, stk. 3.

Í 2009 tók Høvuðsbarnaverndarnevndin 204 avgerðir um fyriskipanir og góðkenningar av bráðfeingisavgerðum, meðan talið var 165 og 156 í ávikavist 2007 og 2008. Viðmerkjast skal, at fleiri avgerðir kunnu vera um sama barn í einum ári, og fleiri avgerðir kunnu verða tiknar eftir einum tilmæli. Harafturat skal viðmerkjast, at ikki øll tilmælir, sum hava verið løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, eru gingin á møti. Í 2009 hevur nevndin móttikið 118 tilmælir. Í 102 førum hevur nevndin tikið undir við tilmælinum, í 8 førum hevur nevndin ikki tikið undir við tilmælinum, og í øðrum 8 førum hevur nevndin tikið partvís undir við tilmælinum.




| | § 15, stk. 1, nr. 2, sbr. § 15, stk. 4 | § 15, stk. 4 | § 19 | § 23 | § 24, stk. 1 | § 35 | § 33 | §22 | § 24, stk. 4 | § 37 | § 35, stk. 2 | § 17 | § 18 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 9 | 0 | 25 | 2 | 34 | 15 | 7 | 60 | 30 | | | 10 | 0 |
| 2007 | 4 | 3 | 22 | 1 | 37 | 17 | 11 | 25 | 35 | 0 | 0 | 6 | 1 |
| 2008 | 9 | 0 | 23 | 1 | 32 | 14 | 7 | 30 | 29 | 1 | 0 | 10 | 0 |
| 2009 | 2 | 0 | 25 | 2 | 40 | 22 | 6 | 31 | 60 | 0 | 2 | 14 | 0 |

Sum talvan omanfyri vísir, vóru 25 av avgerðunum í 2009 um umsorganaryvirtøku. Hetta tal er ikki nógv broytt árini 2007 – 2009. Harafturímóti eru væl fleiri avgerðir um setan á stovn

eftir § 35, um eftirmetan av samveru eftir § 24, stk. 4 og um góðkenning av bráðfeingisavgerðum eftir § 17 í 2009 enn undanfarin ár.

Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um umsorgarnaryvirtøku við ella uttan samtykki.

**Avgerðir um umsorganaryvirtøku**




| | Umsorganary virtøka við samtykki | Umsorganary virtøka uttan samtykki | Umsorganary virtøka uttan samtykki frá foreldrunum, men við samtykki frá tí unga yvir 15 ár | Umsorganary virtøka við samtykki frá foreldamynd ugleika, men uttan samtykki frá tí unga yvir... | Varandi umsorganary virtøka uttan samtykki | Varandi umsorganary virtøka við samtykki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 12 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 2007 | 51 | 7 | 1 | | 1 | 0 |
| 2008 | 50 | 5 | 1 | | 0 | 0 |
| 2009 | 54 | 4 | 0 | 3 | 2 | 1 |

Sum talvan omanfyri vísir, eru nógv tær flestu avgerðirnar um umsorganaryvirtøku tiknar við samtykki. Tó eru nakrar avgerðir tiknar uttan samtykki.

Strembast skal eftir at seta røttu fyriskipanina inn beinanvegin. Enn fyriliggja eingi hagtøl, ið kunnu siga nakað um, hvørt tann fyrsta fyriskipanin, sum er sett í verk, virkar, ella um neyðugt er at seta fleiri fyriskipanir í verk eftir hvørja aðra. Viðmerkjast skal, at barnaverndarlógin gevur møguleika fyri, at eitt barn kann umsorganaryvirtakast, uttan at tað fyrst hevur verið sett ein fyribyrgjandi fyriskipan í verk, um hetta verður mett best fyri barnið.

Talvan niðanfyri vísir aldurin á børnum, ið eru umsorganaryvirtikin.

**Umsorganaryvirtøka eftir § 19**




| | 0 - 3 ár | 4 - 6 ár | 7 - 11 ár | 12 - 14 ár | 15 - 18 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 1 | 2 | 0 | 4 | 7 |
| 2007 | 5 | 1 | 11 | 17 | 25 |
| 2008 | 9 | 5 | 13 | 13 | 16 |
| 2009 | 12 | 7 | 13 | 9 | 20 |

Talvan vísir, at flestu børn, ið vera umsorganaryvirtikin, eru 15 ár ella eldri. Tó sæst, at talið av børnum yngri enn 4 ár, ið vera umsorganaryvirtikin, er vaksandi, meðan talið á børnum í aldrinum 12 – 14 ár lækkar.

Arbeiðsbólkurin metir ikki, at nøkur greið niðurstøða kann gerast út frá fyriliggjandi tølum, men tølini kundu bent á, at sett verður inn við umsorganaryvirtøku fyrr nú enn áður.

Fosturforeldrafelagið vísir á, at tað eftir teirra meting oftani vísir seg, at tørvurin hjá børnunum má víkja fyri rættindunum hjá biologisku foreldrunum, og at arbeitt verður ímóti andanum í lógini.

Sambært § 57 hava foreldur og børn, ið eru fylt 15 ár, sum ikki hava givið samtykki, rætt til ókeypis umboðan, í sambandi við at mál verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Harafturat kann Høvuðsbarnaverndarnevndin avgera, at hesi fáa ókeypis umboðan, hóast samtykki fyriliggur. Eisini kann Høvuðsbarnaverndarnevndin tilnevna ein talsmann fyri barnið í málum, sum verða viðgjørd í nevndini.

Sambært ársfrágreiðingini frá Høvuðsbarnaverndarnevndini, játtaði nevndin 9 persónum ókeypis umboðan í 2009.




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|
| Foreldur | 3 | 7 | 8 | 7 |
| Barn | 0 | 0 | 1 | 2 |

Talvan omanfyri vísir, at tað oftast eru foreldur, sum fáa játtað ókeypis umboðan. Av teimum 9 játtaðu umbønunum um ókeypis umboðan í 2009, vóru 7 til foreldur, meðan 2 vóru til børn.

Vísandi til at eingin kanning er gjørd í mun til uppáhaldið hjá Fosturforeldrafelagnum um, at tørvurin hjá børnunum má víkja fyri rættindunum hjá biologisku foreldrunum, metir arbeiðsbólkurin seg ikki kunna taka støðu til uppáhaldið. Mett verður, at eftirlit við málsviðgerðini í barnaverndarmálum kann geva innlit í, um størri atlit verða tikin til foreldrini enn til børnini.

Gigni og Nærverkið (Børn og Ung) vísa á, at barnaverndarlógin hevur viðført stóran bata á økinum – málsviðgerðin er styrkt og gjøgnumskygni er størri, eins og rættartrygdin er økt.

Arbeiðsbólkurin tekur undir við, at barnaverndarlógin hevur havt við sær stóran bata í mun til at styrkja málsviðgerðina og rættartrygdina hjá børnum og foreldrum. Vísandi til, at

lutfalsliga fá mál eru kærd, og at kærumyndugleikin í flestu málum hevur staðfest avgerðina, sum er kærd, verður mett, at tey mál, ið hava verið kærd, hava verið viðgjørd á rættan hátt.

## 18. Tilráddar tillagingar í barnaverndarlógini

Samanumtikið verður mett, at barnaverndarlógin virkar eftir ætlan. Tó verða allar heimildir í lógini enn ikki brúktar til fulnar. Orsøkin er í stóran mun, at ivi er um, hvussu ásetingarnar skulu umsitast og brúkast. Tískil metir arbeiðsbólkurin, at tað skulu gerast ymiskar vegleiðingar og mannagongdir til lógina. Harafturat verður mett, at nakrar tillagingar skulu gerast í lógini, soleiðis at hon fer at virka enn betur.

Sum tað sæst í frágreiðingini, er arbeiðsbólkurin ikki samdur í øllum innkomnu viðmerkingunum. Niðanfyri verður tikið samanum tær tillagingar, sum arbeiðsbólkurin metir eru neyðugar:

1. Broyta aldursmarkið til 23 ár.
2. Gera vegleiðing um markamót millum barnaverndarlógina og forsorgarlógina.
3. Gera vegleiðing um markamót millum barnaverndarlógina og ættleiðingarlógina.
4. Færri og størri barnaverndarøkir.
5. Størri faklig krøv til starvsfólk í barnaverndarumsitingunum.
6. Umhugsa, um Barnaverndarstova Føroya skal virka sum ráðgevi hjá landsstýriskvinnuni.
7. Gera vegleiðingar í mun til málsviðgerð.
8. Støða skal takast til, hvørji hagtøl ynskjast, og hvørji hagtøl Barnaverndarstova Føroya skal savna og umsita.
9. Umhugsa, um avmarking skal ásetast um, hvussu leingi ein limur kann sita í Høvuðsbarnaverndarnevndini.
10. Strika orðið "álvarsama" í § 14, stk. 3.
11. Gera vegleiðingar og mannagongdir um tvørfakligt samstarv.
12. Heimila, at barn kann fáa hjálp eftir § 15, stk. 1, nr. 1, uttan at foreldrini verða kunnað.
13. Heimila at seta eitt barn yvir 15 ár í viðgerð eftir § 15, stk. 1, nr. 1 uttan barnsins samtykki, eins og tað skal vera møgulig at taka barnið úr heiminum við tvingsli, um tann, ið hevur foreldramyndugleikan, setur seg upp ímóti avgerðini.
14. Heimila at seta kvinnu, ið er við barn, í rúsevnisviðgerð uttan hennara samtykki.
15. Familjuviðgerð á stovni hjá landinum skal ikki ásetast í § 15, stk. 4, men flytast til § 33, og samstundis áseta, at familja kann innskrivast til samdøgurstilboð ella dagtilboð.
16. Arbeiða við at fáa familjuviðgerð viðurkenda sum eina viðgerð, ið gevur rætt til sjúkramelding, á sama hátt sum rúsevnisviðgerð.
17. Heimila, at tað kann krevjast, at familjan hjá einum barni, ið er sett heiman, skal til viðgerð ella samtalu á stovni hjá landinum.
18. Tað skal ikki kunna áleggjast foreldrum at rinda fyri sosialt pláss á dagstovni.
19. Gera reglar um løn til ung í arbeiði eftir § 15, stk. 1, nr. 5, herímillum hvør skal rinda hesar útreiðslur.
20. Gera vegleiðing um, nær fosturforeldur hava rætt til umlætting eftir barnaverndarlógini.

21. Heimila, at barn, ið er innskrivað á samdøgursstovn, kann hava uppihald hjá fosturforeldrum, meðan tað er innskrivað, herímillum um samsýning til fostuforeldrini og hvør skal halda útreiðslurnar.
22. Umhugsa at áseta, at óheftur fastur persónur skal tilnevnast øllum børnum, ið verða sett heiman.
23. Umhugsa at áseta, at foreldur skulu hava rætt til at velja sær ein fastan stuðulspersón.
24. Flyta ásetingina í § 15, stk. 1, nr. 11 til § 8, stk. 3.
25. Skerpa fráboðanarskylduna hjá fakfólki í § 14.
26. Gera vegleiðing um innihaldið í § 16.
27. Áseta í § 16, hvussu ofta barnaverndartænastan skal eftirmeta eina fyriskipan, bæði í mun til barnið og foreldrini.
28. Áseta, nær ein eftirmeting í seinasta lagi skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.
29. Umhugsa, um tað skal ásetast ein freist fyri, hvussu skjótt upplýsingar frá fakfólki skulu latast barnaverndartænastuni.
30. Gera vegleiðing til § 19, herímillum hvussu hugtakið "álvarsamur ágangur" skal skiljast.
31. Áseta í § 24, at mál um at seta barn heim aftur til foreldrini skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan.
32. Áseta, hvussu ofta eitt mál skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til eftirmetan.
33. Víðka § 23 um varandi umsorganaryvirtøku.
34. Heimila Høvuðsbarnaverndarnevndini, í ávísum førum, at geva barnaverndartænastuni heimild at áseta og skipa samveru.
35. Broyta § 24, stk. 4, soleiðis at avgerð um samverurætt *skal* endurskoðast samstundis sum málið um umsorganaryvirtøku.
36. Áseta linari krøv til góðkenning av næstrafólkum sum fosturforeldur.
37. Rætta § 29, stk. 2, soleiðis at tað framgongur, at tað er avvarðandi barnaverndartænasta, ið rindar fosturforeldrum samsýning.
38. Áseta, at Høvuðsbarnaverndarnevndin altíð skal hoyra fosturforeldur.
39. Gera vegleiðing um, hvussu samsýning til fosturforeldur skal ásetast.
40. Um "proffesjonel" fosturforeldur verða upprættað, skulu hesi hava løn.
41. Stovna tilboð um eftirvernd og útslúsing.
42. Umskipa serdagstovnin og víðka virksemið.
43. Broyta orðingina í § 39, stk. 3, so heimildin verður rætt orðað.
44. Broyta orðingina í § 35, soleiðis at uppgávan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini verður greitt orðað, eins og tað skal ásetast, hvør hevur ábyrgdina av, at barnið verður sett á rættan samdøgursstovn.
45. Strikað § 33, stk. 3.
46. Gera kunngerð um viðurskiftini millum føroysku og donsku myndugleikarnar, tá barn verður sett á stovn í Danmark.
47. Áseta neyvt í § 45, hvat kanningin skal fevna um, og hvat kanningin skal lýsa.
48. Áseta heimild, soleiðis at eitt mál kann lýsast til fulnar uttan samtykki.
49. Heimila Høvuðsbarnaverndarnevndini at taka avgerð um, at eitt barn ikki kann setast heim aftur, uttan at foreldraførleikakanning er gjørd.

50. Gera vegleiðing um, hvørjar upplýsingar skulu fyriliggja í málum um umsorganaryvirtøku.
51. Umhugsa at heimila mediatión fyri at styrkja samstarvið við foreldrini.
52. Áseta neyvt, hvørjar ætlanir barnaverndartænastan skal gera eftir § 47, og hvat innihaldið skal verða.
53. Gera vegleiðing og mannagongdir í sambandi við, at foreldur flyta úr Føroyum.
54. Broyta § 63, soleiðis at tað greitt verður tilskilað, at greinin snýr seg um viðurskifti millum føroyskar barnaverndarnevndir.
55. Gera kunngerð um eftirlit.
56. Seta fólk til burturav at fremja eftirlit.
57. Fáa avklárað ivamál um, hvør er kærumyndugleiki í ávísum málum.
58. Arbeiða fyri, at barnaverndartænastan kann kæra avgerð hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.
59. Strika §§ 70 og 71.
60. Broyta orðalagið í lógini.
61. Gera vegleiðingar við allýsingum av hugtøkum í lógini.
62. Umhugsa at broyta heitið "barnaverndartænasta".

Harafturat má avtala gerast við aðrar myndugleikar um tilboð, teir varða av, eitt nú í mun til skúla, rúsevnisviðgerð og útgreining.

**Skjøl:**
Skjal 1: Viðmerkingar til frágreiðingina frá Fosturforeldrafelagnum.
Skjal 2: Viðmerkingar til frágreiðingina frá Gigni.
Skjal 3: Viðmerkingar til frágreiðingina frá barnaverndartænastunum.

Almannamálaráðið, tann 1. februar 2011

O. Balle

Oddbjørg Balle, leiðari
Barnaverndarstova Føroya

Johild Ziskason

Johild Ziskason, samskipari
Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini

Majbritt L. Jacobsen

Majbritt L. Jacobsen, fulltrúi
Nærverkið

Berit Unn Petersen

Berit Unn Petersen, fulltrúi
Nærverkið, Børn & Ung

Højgaard

Tórhild Højgaard, fulltrúi
Almannamálaráðið

**Skjal 1**

til: Tórshavn tann 30. Januar 2011

**AMR att: Tórhild Højgaard**

Fosturforeldrafelagið takkar fyri tað góða samskifti, vit hava havt við teg og arbeiðsbólkin í samband við endurskoðan av "Barnaverndarlógini". Eisini takka vit fyri, at vit hava fingið høvi at síggja uppskotið/frágreiðingina hjá tykkum, og fyri høvi at koma við nøkrum seinastu viðmerkingum. Eisini er gott at síggja, at tit, hóast ikki samd við okkum í øllum, so hava tit kortini í nógvum førum latið okkara orð og hugsanir standa í frágreiðingini. Sum heild má sigast, at nógvir batar eru at síggja í uppskotinum.

Kortini mugu vit siga at hóast vit eru púra samd um at "Barnsins áhugamál skulu takast fram um alt annað, so hava vit í ávísum førum ilt við at síggja, at broytingarnar, sum tit skjóta upp eru nóg víðfevndar. Til dømis eigur tað ikki bert at vera ein møguleki hjá HBVN at krevja eina foreldraførleikakanning, tað eigur at vera krav, at áðrenn børn vera flutt heimaftur skal ein slík kanning gerast. Eisini halda vit fast við, at tá heilt lítil børn vera sett heiman, má barnið fáa frið, í minsta lagi til tað er 3 ár. Ov nógv "kann" í lógini gagnar sjáldan barninum.

Í teimum truplu málunum er tað av sera stórum týdningi, at myndugleikarnir fara heilt og ikki hálvt inn í málini. Er eitt mál byrjað, tola børnini snøgt sagt ikki iva og drál, sum stendst av treiskni hjá foreldrunum og teirra dugnaligu advokatum. Vit hava sæð ógvusligu avleiðingarnar av avgerðum ella væntandi avgerðum orsakaðar av tílíkum atburði, og mugu fylgjurnar í summum førum sigast at nærkast hugtakinum píning.

Esini halda vit, at tað verður lítil nytta í kontaktpersónum, sum børn sjálvi skulu velja. Hetta eiga at vera fakfólk, sum gjøgnum regluligt samband duga at gera seg til vin við børnini og eisini duga at seta orð á teirra tørv.

Eisini vilja vit vísa á at hóast "Fosturforeldrafelagið er eitt privat áhugafelag, ið ikki er álagt nakrar skyldur eftir barnaverndarlógini", so eru vit í ávísum førum tey einastu, sum kunnu hjálpa fosturforeldrum, ið hava liðið sálarligan skaða av uppgávuni sum fosturforeldur. Hetta kemst av tí, at vit í lógini og skipanini eru næstan fullkomiliga ósjónlig, tá á stendur. Vit vita um fosturforeldur, sum hava sera stóran tørv á hjálp, men sum ikki vilja vita av nøkrum persóni í skipanini. Her nyttar lítið at fortelja hesum, at tey bara kunnu venda sær til fosturforeldraskipanina.
Haraftrat vilja vit halda fæst við ynski okkara at felagið verður góðkent sum okkara fakfelag og at samsýningin verður normalisera sum løn og at 1,5% verða goldin til felagið

Vinarliga vegna Fosturforeldrafelagið

Lissi Hansen Torkil Hansen Dánial á Dul Jacobsen

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Tórshavn, tann: 31. januar 2011**

**J. nr. 200600164 / 10**
(at tilskila í svari)
**Viðgjørt: BV, IJ/pm**

**Tygara skriv:**

**Viðmerkingar frá Gigni – heilsufrøði til børn & ung til gjørdu frágreiðing í samband við endurskoðan av Barnaverndarlógini.**

Víst verður til fyrrgjørdu viðmerkingar hjá Gigni til galdandi Barnaverndarlóg.

**Hvør er leikluturin hjá Gigni í mun til børn og ung ið verða fevnd av Barnaverndarlógini?**
Gigni arbeiðir sambært løgtingslóg nr. 63/2005 um fyribyrgjandi heilsuskipanir til børn og ung.
Lógin umfatar tað ófødda barnið, eins og øll børn frá tí tey eru fødd, til undirvísingarskyldugur aldur endar. Hesi **skulu** (ikki kunnu) fáa tilboð um tænastu frá Gigni. Umframt vanliga tænastu, er ásett við lóg, kunngerð umframt leiðreglum frá Sundhedsstyrelsen, at **tá talan er um serligan tørv, skulu hesi raðfestast og fáa eina meirtænastu í mun til tørvin hjá tí einstaka**. Tað vil siga, at um vit velja barn, ungan ella familju til avvarðandi BVT, fáa hesi meirtænastu frá Gigni, og verða raðfest, óheft av teimum møguligu fyriskipanum BVT annars setur í verk.

Viðmerkjast skal eisini, at serligur tørvur í hesum sambandi er eitt sera vítt hugtak, og skilja vit í millum serligan tørv ið er tíðaravmarkaður, eins og annar serligur serligur tørvur. Gigni ynskir at vísa á, at innan okkara øki, so eru øll børn og ung, eins og familjur, ið av einihvørjari orsøk verða fevnd av barnaverndarlógini, at meta sum serligur tørvur, ið sostatt skal raðfestast framum annað.

Eisini ynskir Gigni at vísa á, at tænastan frá Gigni er púra óheft av, um barnið er í, ella ikki er í einari fyriskipan, sett í verk av BVT. Hetta bæði tá talan er um fyribyrgjandi fyriskipanir, eins og tá barnið ella tann ungi er umsorganaryvirtikin og sett til fosturs, ella tey eru innskrivaði á samdøgursstovn. Herundir eisini tá barnið saman við øðrum ella báðum foreldrum verða innskrivaði til familjuviðgerð ella eygleiðing.

Sostatt, er Gigni altíð ein sjálvsagdur samstarvsfelagið hjá BVT, tá talan er um børn og ung fevnd av BVL. Hetta meta vit, setur stór krøv til tætt samstarv, barninum ella tí unga at frama.

Viðmerkjast skal eisini, at tænastan hjá Gigni sambært §1 í lóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir skal: tryggja børnum og ungum best møguligar fyritreytir fyri einum heilsugóðum uppvøkstri og vaksnamannalívi við at veita tilboð um fyribyrgjandi heilsutænastur. Í hesum sambandi skal eisini vísast á, at Gigni lýsir heilsu sum, likamliga, sálarliga og sosiala heilsu, menning og trivnað.

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

2
Gigni metir framvegis, at heilsa eigur at verða greina sum likamlig, sálarlig og sosial heilsa, hetta fyri at øll viðurskiftir verða havd í huga, tá um ræður heilsu, menning og trivnað hjá børnum og ungum í Føroyum. Sjá omanfyri.

3
Vilja framvegis vísa á innsendu viðmerkingarnar til lógina. Gigni metir framvegis, at tað eiga at verða settar fakligar treytir fyri at vera limur í barnaverndarnevndini. Viðkomandi útbúgving – hvat er tað?? Er alt ov veikt orða, og eigur tí, at verða lýst meira ítøkiligt, so barnasakkunnleikin verður gjørdur týðiligur.

Gigni er fullgreitt yvir, at nevndirnar bert taka støðu til framløgdu og tilmæltu fyriskipanir, sum barnaverndartænasturnar standa fyri. Tó meta vit, at fyri at kunna taka støðu til um hetta er ein nøktandi fyriskipan og um hon er tann besta til barnið, er neyðugt við einum ávísum førleika. Hóast eitt tilmæli um fyriskipan er fyrireikað av fólkið, við nøktandi fakligum førleika, so er neyðugt við einum fakligum førleika fyri at taka støðu til tilmælta.

Viðvíkjandi fakliga førleikanum í barnaverndarumsitingunum, so eru vit samdar í, at útbúgving eigur at raðfestast, so at málsviðgerðin verður tryggjað, tó kundi orðingin: **eigur** umsitingin at leita sær ráð og vegleiðing frá fólki, ið hevur serligan fakligan kunnleika í mun til tørvin ella trupulleikan, soleiðis at fakliga ástøði í málsviðgerðini eisini verður raðfest, verið broytt til: **skal** umsitingin leita sær .....

**Viðvíkjandi atlitið til fíggjarligu støðuna, og um tað er ein vandi at sosiala deild og BVT er ein og sami myndugleiki.**
Víst verður aftur til innsendu viðmerkingarnar. Vit er greið yvir, at barnaverndarnevndirnar ikki eru ein partur av sosialu deildunum, og harvið fíggjarliga partinum. Sum sagt verður í frágreiðingini, so skal nevndin bert taka støðu til tað tilmæling og frágreiðing ið barnaverndarumsitingin leggur fyri nevndina. Vansin er, at barnaverndarumsitingin, sum ið ávísum kommunum er sosiala deild, tilmælir eina fyriskipan fyri nevndina, sum kann verða gjørd, undir trýstið av fíggjarligu støðuni í kommununi. Sostatt kann í ávísum førum verða tilmælt ein fyriskipan, sum ikki er tann besta til barnið, men kanska tann næstbesta og heldur bíligari fyriskipanin.

3.3
Eru samd við arbeiðsbólkinum, undantikið Barnaverndarstovu Føroya, at loyalitetsspurningur kann standast av, at Barnaverndarstovan er kommunal og samstundis skal ráðgeva landsstýrismanninum á økinum.

Viðvíkjandi málsviðgerðini, sum skriva verður ikki enn er eins um alt landið, so meta vit, at tað er alneyðugt, at gjørdar verða neyðugar tillagingar soleiðis, at barnið og familjan verða tryggjaðu somu málsviðgerð á fakliga høgum støði, og at hendan ikki er treyta av hvar bústaðurin hjá barninum er landafrøðiliga.

Mett verður eisini, at tað er neyðugt við einari felags leiðslu fyri allar barnaverndartænasturnar, so at mannagongdir og málsviðgerð, ikki er upp til hvønn einstakan leiðara á barnaverndartænastunum, men, at hetta verður miðsavna til eina leiðslu, sum ikki bert er ráðgevandi, men eisini hevur yvirskipaða myndugleikan.

Viðvíjandi hvør skal umsita stovnar, sum viðvíkja børnum, ungum og familjum í Føroyum, so metir Gigni, at hesir stovnar kundu verið lagdir til Gigni at umsita.

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

**3.4**
Gigni metir heilt víst, at høvuðsbarnaverndarnevndin eigur at varðveitast í tí líki og við teimum avgerðarrættindum hon hevur í dag. Vit meta als ikki, at avgerðarrættur eigur at verða lagdur til staðbundnu barnaverndarnevndirnar, bæði við atlitið til fakførleikan, men eisini tí hetta er at venda aftur til støðuna, sum hon var áðrenn núverandi barnaverndarlóg.

Vit eru samd við bólkinum í, at umhugsa eigur at vera, hvørt ásetast skal eitt ávíst áramál fyri nær limir skulu skiftast út. Tó, so er alneyðugt, at áramálið ikki er ov lágt sett, tá hugsa verður um fakliga førleikan og fakliga støði/menningina, ið nevndararbeiði viðførir.

At høvuðsbarnaverndarnevndin setur høg krøv til málsviðgerð og fyrireiking av tilmælum metir Gigni er gott, og er við til, at tryggja málsviðgerðina eins og eina fakliga kvalifiseraða avgerð.

**4**
Eru samd við bólkinum í, at kunnleiki eigur at verða broytt til varhuga.

Gigni arbeiðir sambært lóg nr. 63/2005 um fyriskipandi heilsuskipanir til børn og ung, har málbólkurin er tað ófødda barnið, eins og øll børn og ung frá 0 ár til skúlaásetti aldurin endar. Eisini stendur í lógini umframt kunngerðini, at øll børn og ung í málbólkinum **skulu** fáa bjóða tænastu frá Gigni.

Staðfestast skal tí, at óansæð um talan er um børn ella ung í vanligum familjum, ella talan er um børn og ung ið á einhvønn hátt koma undir barnaverndarlógina, so er barnið ella tann ungi, herundir eisini tað ófødda barnið og mamman fevnt av lógini ið Gigni arbeiðir eftir. Harumframt, so skal Gigni raðfesta tey børn og ung, sum hava ein serligan tørv. Staðfestast má, at børn og ung ið koma undir Barnaverndarlógina, eins og ófødda barnið og mamman ið koma undir somu lóg, hava ein serligan tørv og tí skulu raðfestast av Gigni.

Henda staðfesting viðførir, at tá talan er um ófødda barnið, børn ella ung ið av einihvørjari grund verða ávíst til BVT, **so er Gigni altíð ein partur av hesum málbólki á ein ella annan hátt**. Um málbólkurin fær ella ikki fær tænastu frá Gigni, er fullkomiliga óheft av, um BVT setur eina fyriskipan í verk ella ikki, herundir eisini, um talan er um at seta børn og ung til fosturs ella á samdøgursstovn.

Hóast Gigni altíð heldur fram við at veita hesum børnum og ungum tænastu, so má metast alneyðugt, at eitt skipa samstarv millum BVT og Gigni verður sett í verk. Hetta fyri at tryggja, at BVT og Gigni arbeiða við somu fakliga settu málum í hvørjum einstøkum føri.

Tí metir Gigni, at tað er alneyðugt, at loyvt verður BVT at geva Gigni eina fráboðan/afturboðan, tá BVT fær eina fráboðan, eins og at samstarva í mun til møguligar fyriskipanir ið verða settar í verk.

Vísast skal í hesum sambandi til nýggju lógina, ið er samtykt í DK í samband við Barnets Reform. Í § 153 stk. 3 stendur soleiðis:

*Kommunalbestyrelsen skal, medmindre særlige forhold gør sig gældende, efter anmodning videregive oplysninger til den person, der har foretaget underretningen efter stk. 1 eller efter regler udstedt i medfør af stk. 2, 1. pkt., om, hvorvidt underretningen har givet kommunen anledning til undersøgelser eller foranstaltninger efter denne lov vedrørende det*

Niels Finsensgøta 37 TEL: +298 562 300
Postboks 132 EMAIL: gigni@gigni.fo
110 Tórshavn www.gigni.fo

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

*barn eller den unge under 18 år, underretningen vedrører.«*

Sostatt er lógin broytt frá, at málsvøgerðin skal meta um, hvørt tað er neyðugt at boða aftur, til at meta um, hvørt tað eru álvarslig viðurskifti í tala ímóti eini afturboðan. Hetta júst tí, at mett verður sera neyðugt, at ymisku fakbólkarnir vita hvat hvør annar arbeiðir við í sama málbólki, eins og fyri at tryggja, at allur fakkunnleiki arbeiðir eftir sama leisti og við somu endamálum, fyri at tryggja bestu fortreytir fyri børnum og ungum.

Endamálið við Barnets Reform er júst at kvalifiserað og intensiverað málsviðgerð og tvørfakligt samstarv.

Gigni metir framvegis, at ein serstøk áseting eigur at gerast viðvíkjandi samstarvið við Gigni, hetta tí, at Gigni er núverandi einasti almenni serkunnleiki, sum kontinuerligt er í samband við øll børn og ung í Føroyum. Tey børn og ung, ið verða umfevnd av BVL eru ein partur av málbólkinum hjá Gigni.

Gigni metir ikki, at hesin trupulleiki verður loystur við at BVS og Almannaráðið gera mannagongdir, tí BVS er "bert" ráðgevandi til BVT og hevur sostatt ikki myndugleika til at seta mannagongdir í verk. Vit meta tí, at myndugleikin yvir BVT og Gigni eiga at samstarva um, at gera greiðar mannagongdir, sum kunna tryggja bestu umstøður fyri børnini og tey ungu. Í hesum sambandi verður víst til áðurnevndu viðmerking um eina yvirskipaða leiðslu á økinum.

**6.1.1 og 6.1.2**
Gigni metir, at ein og hvør fyriskipan eigur at kunna vísa á, námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga endamálið við fyriskipanini, herundir hvussu fyriskipanin verður skipa og hvør fakkunnleiki er í skipanini. Hetta fyri, at tað er greiðari bæði fyri fakkunnleikan, BVT og Høvuðsbarnaverndarnevndina, hvør fyriskipan kann metast at vera tann besta í hvørjum einstøkum førið, eins og hvat kann væntast at fáast burturúr, at velja eina fyriskipan fram um eina aðra.

**6.1.4**
Gign er ímóti at børn í undirvísingarásettum aldri arbeiða. Tó, tá talan er um arbeiðstilboð, sum verður veitt ungum, tí hetta verður mett at menna tann unga og er liður í einum námsfrøðiligum tilboði, er tað sjálvandi gott. Gigni metir tó ikki, at hetta eigur at tengjast saman við, at tann ungi í hesum sambandi skal gjalda part av sínum uppihaldi ella útreiðslum, í samband við at tað er innskrivað á stovni ella í fosturfamilju.

**6.1.6**
Í ávísum førum, er eisini møguligt, at heilsufrøðingurin, sum frammanundan kennir barnið ella tann unga, umframt familjuna, kann vera kontaktpersónur. Tað er tó týdningarmikið, at barnið ella tann ungi sleppur at velja sjálvt tann persón, ið tey hava mest álit á, og eru nærknýtt at.

**6.4**
Gigni hevur longu, eftir lóg um fyriskipandi heilsuskipanir til børn og ung eftirlit, við almennu umstøðunum hjá øllum børnum og ungum í Føroyum. Um tað er so, at BVT longu nú hevur heimild til at áseta, at børn og ung skulu fáa tilboð frá Gigni, so eigur ein mannagongd at vera gjørd, sum greitt ásetir hvussu hetta og nær tað skal verða gjørt.

Niels Finsensgøta 37
Postboks 132
110 Tórshavn
TEL: +298 562 300
EMAIL: gigni@gigni.fo
www.gigni.fo

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Viðmerkjast skal aftur her, at tænasta frá Gigni er ikki tengd at, hvørt BVT er inni í myndini, ella ikki. Gigni er og verður altíð ein partur av almenna tilboðnum til børn og ung, og er óheft at BVT. Tó verður aftur her mett, at um arbeiði skal vera til besta fyri barnið ella tann unga, so er neyðugt við einum neyvum samstarvið millum Gigni og BVT.

Sagt verður at ein mannagongd er við at verða gjørd, tá talan er um børn ella ung ið eru fyri kynsligum ágangi, eins og at hetta er til hoyringar í løtuni. Gigni metir, at hetta uppskot eigur at verða sent Gigni til hoyringar, tá Gigni er einasti fakbólkur ið kemur í samband við øll børn og ung í Føroyum. Gigni er tí ofta tann fyrsti fakbólkurin, sum kemur í samband við barnið ella tann unga, sum hevur verið fyri kynsligum ágangi.

Víðvíkjand innsendu viðmerking frá Gigni í mun til áseting av læknakanning og viðgerð, so metir Gigni framvegis, at orðingin "hóskandi viðgerð ella kanning" er at skilja hjá lækna. Vit meta tí, at ein greiðari orðing verður vald, og at heilsufrøðingurin verður nevndur.

**6.5.1**
Orðingin við jøvnum millumbili eigur at verða meira nágreiniliga sett, so málsviðgerðin ikki í hvørjum einstøkum førum skal meta um hvat javnt millumbil er.

Gigni metir, at tað heilt greitt eigur at ásetast, at hædd skal vera tikin fyri barnið ella ungum, tá hesi fráboða t.d. til heilsufrøðingin, at tey ikki ynskja at fara heim aftur, tí tey eru fyri ágangi heima. Í hesum førum, eigur bráðfengis avgerð at verða tikin um umsorganaryvirtøku, meðan málið verður kannað nærri.

Eisini eru vit púra samd í, at eitt mál altíð eigur at verða lagt fyri Høvuðsbarnanevndina, í góðari tíð, áðrenn ein fyriskipan gongur út. Hetta eisini, tá ætlanin er, at barnið ella tann ungi skal setast heim aftur. Barnið ella tann ungi eigur altíð at verða hoyrt í hesum sambandi.

**6.5.3**
Tað eigur at vera greitt, at samveran er rætturin hjá barninum, og ikki rætturin hjá teimum vaksnu. Tískil eigur altíð at verða tikið atlit til, hvørt samveran og hátturin samveran er skipað, er til barnsins besta og ikki verður ásett, til besta fyri tey vaksnu.

Ein áseting eigur eisini at verða gjørd, um hvønn leiklut BVT kann hava í mun til samveru ásett av Ríkisumboðnum, í teimum førum, har samveran vísir seg, at vera til ampa fyri barnið, hóast onnur viðurskifti vísa seg at vera í lagi. Gigni fær javnan afurvendandi fyrispurningar í hesum sambandi.

7
Gigni metir, at eitt barn, sum verður sett heiman og sostatt fer til fosturs ella í aðra fyriskipan, **altíð** er eitt barn við serligum tørvi sambært galdandi leiðreglum frá Sundhedsstyrelsen. Tískil er hetta ein málbólkur, sum sambært fyribyrgjandi heilsuskipanir til børn og ung skal raðfestast av Gigni.

Tískil metir Gigni, at Gigni altíð eigur at fáa fráboðan tá eitt barn ella ungur kemur í fyriskipan, har tey verða sett heiman, so tey kunna fáa ta lógarásettu tænastu, til besta fyri barnið ella tann unga.

Mett verður eisini, at tá talan er um størri børn í skúla, so eigur Gigni eisini altíð at verða boða frá, tí tað er eingin grund til, at hetta skal verða álagt skúlanum at fráboða Gigni.

Niels Finsensgøta 37
Postboks 132
110 Tórshavn
TEL: +298 562 300
EMAIL: gigni@gigni.fo
www.gigni.fo

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

**7.3**
Viðmerkjast skal, at fosturforeldur, á jøvnum føtum við biologisk foreldur, hava rætt til tænastu frá Gigni, herí roknað ráð og vegleiðing, sum ásett í §5 stk. 2 í kunngerð til lóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir til børn og ung. Gigni ynskir, at fosturforeldur verða kunnaði um hetta, tá tey gerast fosturforeldur.

**8.2**
Mett verður, at tað ikki er skilagott, í mun til loyalitet, at sami stovnur sum rekur ein samdøgursstovn eisini skal hava yvirskipaða eftirlitið við stovninum. Hetta merkir jú, at stovnurin hevur etirlit við sær sjálvum!!

**9.2.1**
Viðmerkjast skal, at viðkomandi heilsufrøðingur, ella ein av leiðarunum í Gigni eiga at verða partur av tilvísingarbólkinum, sum barnasakkønur fakkunnleiki, við høgum ástøðiligum kunnleika til børn, ung og familjur, og teirra likamligu, sálarligu og sosialu heilsu, menning og trivnað.

**12**
Viðmerkjast skal aftur, at eftirlit eigur at vera óheft av tí myndugleika, sum rekur stovnarnar, eins og, at eftirlitið við fyriskipanum settar í verk av BVT eigur at verða eitt óheft eftirlit.

Viðmerkjast skal eisini, at tað í lóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir til børn og ung er ásett, at Gigni skal hava eftirlit við almennu heilsuumstøðurnar hjá børnum og ungum í Føroyum. Hetta eftirlit er óheft av, um talan er um børn og ung ið eru undir fyriskipan undir Barnaverndarlógini ella ikki. Eisini er skyldan hjá Gigni at viðmerkja og fráboða tá talan er um heilsuumstøður, ið eru til ampa fyri børn og ung í Føroyum bæði heim, á skúlum og á stovnum.

Vinarliga

Bjarta Vilhelm, leiðari

Niels Finsensgøta 37
Postboks 132
110 Tórshavn
TEL: +298 562 300
EMAIL: gigni@gigni.fo
www.gigni.fo

**Viðmerkingar til frágreiðingina frá barnaverndartænastum**

1. Broyta § 43 soleiðis, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð, um helvtin av limunum, formaðurin **ella næstformaðurin**, eru til staðar.
2. Av tí at fast samband ikki er millum øll øki í Føroyum, eigur § 4, stk. 1 og 5 ikki at takast burtur. Hetta tí tað flytur tænastuna longur burtur frá brúkaranum, og havið verður tænastan verri atkomulig. Av royndum sæst, at tænastur staddar í aðrari oyggj, ikki er ein góð loysn fyri økið.